# FRÁGREIÐING UM BURÐARDYGD

# 2024 & 2025



J&K PETERSEN

# FRÁGREIÐING UM BURÐARDYGD 2024 & 2025

**Frágreiðingin hjá J&K Petersen fyri 2024 og 2025 er gjørd á samtaksstøði og byggir á VSME 'Grund' tilgongdina.**

**Hon fevnir sostatt um móðurfelagið J&K Petersen Contractors og dótturfeløgini:**

- **J&K Betong Sp/F, á Hjalla, Hoyvík**
- **Klettur Sp/F, á Hjalla, Hoyvík**
- **Miðvágs Grót Sp/F, ytra Bryggja 6, Miðvágur**

**Felagið er eitt partafelag, og virksemið fevnir um húsasmíð (F41) og verklagsarbeiði (F42).**

## LÝSING AV DÓTTURFELØGUM

| Dótturfeløg | | VSME-nr. |
|---|---|---|
| J&K Betong Sp/F | á Hjalla, 188 Hoyvík | B1-24d |
| Klettur Sp/F | á Hjalla, 188 Hoyvík | B1-24d |
| Miðvágs Grót Sp/F | ytra Bryggja 6, 370 Miðvágur | B1-24d |

## LÝSING AV FRÁGREIÐINGINI

| Frágreiðing um burðardygd 2024 & 2025 | | VSME-nr. |
|---|---|---|
| Frágreiðingin tekur støði í VSME-leistinum – Grund | Ja | B1-24a |
| Frágreiðingin tekur støði í VSME-leistunum – Grund og Víðkað | Partvís í viðkað | B1-24a |
| Frágreiðingin er gjørd fyri einstaka fyritøku og ikki fyri eitt samtak | Nei | B1-24c |
| Frágreiðingin er gjørd á samtaksstøði | Ja | B1-24c |

## GRUNDLEGGJANDI UPPLÝSINGAR OG LYKLATØL

| Grundleggjandi kunning um J&K Petersen | | VSME-nr. |
|---|---|---|
| Slag av fyritøku | Partafelag | B1-24e |
| NACE vinnuflokking | F41. Construction of Buildings/Húsasmíð<br>F42. Civil Engineering/Verklagsarbeiði<br>– bólkað á deildarstøði | B1-24e |

| Fíggjarstøða | 2025 | 2024 | VSME-nr. |
|---|---|---|---|
| Fíggjarjavni DKK (t.kr.) | 133.506 | 130.221 | B1-24e |
| Nettoumsetningur DKK (t.kr.) | 217.700 | 301.435 | |
| Nettoumsetningur EUR (t.evr.) | 29.300 | 40.570 | B1-24e |
| Fulltíðarstarvsfólk (ársverk) | 100 | 110 | B1-24e |
| Løntakarar (headcount) | 143 | 182 | B1-24e |

## YVIRLIT YVIR OGNIR VIT EIGA, LEIGA ELLA HAVA RÆÐI Á

| Slag av virksemi | Bústaður | Postnummar | Bygd/býur | Land | Knattstøða | VSME-nr. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Umsiting og betongblandistøð | á Hjalla 13 | 188 | Hoyvík | Føroyar | 62.04823592531796, – 6.799354230770939 | B1-24e |
| Goymsla, sandur og skervur | á Hjalla 16 | 188 | Hoyvík | Føroyar | 62.048672754772014, – 6.799177817276801 | B1-24e |
| Goymsla og verkstaður | á Hjalla 11 | 188 | Hoyvík | Føroyar | 62.04789928721095, – 6.79866961727682 | B1-24e |
| Goymsla, Sund | á Høvdanum 13 | 186 | Sund | Føroyar | 62.048967871982065, – 6.843648265265305 | B1-24e |
| Grótbrot | ytra Bryggja 6 | 370 | Miðvágur | Føroyar | 62.04403127929575, – 7.18050811727703 | B1-24e |
| Starvsfólkabústaður | á Hálsi 6 | 380 | Sørvágur | Føroyar | 62.07097080123692, – 7.2792926382878385 | B1-24e |
| Starvsfólkabústaður | Tinghúsvegur 67 | 100 | Tórshavn | Føroyar | 62.015860701271976, – 6.776512115431422 | B1-24e |

J&K PETERSEN

## BURÐARDYGDARPOLITIKKIR, ÁTØK OG MÁL

| Evni | Hava ítøkiligan politikk/átøk (a) | Eru hesi almenn? (b) | Eru framtíðar mál ásett í politikkinum? (c) | Viðmerking | VSME-nr. |
|---|---|---|---|---|---|
| Veðurlagsbroytingar | Ja | Ja | Nei | Víst verður til Skjal 4. Politikkur fyri burðardygd og samfelagsábyrgd | B2-26 |
| Dálking | Ja | Ja | Nei | Víst verður til Skjal 4. Politikkur fyri burðardygd og samfelagsábyrgd | B2-26 |
| Vatn- og havtilfeingi | Nei | Nei | Nei | Yvirskipað fyri dálking og lívfrøðiligt margfeldi | B2-26 |
| Lívmargfeldi og vistskipanir | Ja | Ja | Nei | Víst verður til Skjal 4. Politikkur fyri burðardygd og samfelagsábyrgd | B2-26 |
| Ringbúskapur | Ja | Ja | Nei | Víst verður til Skjal 4. Politikkur fyri burðardygd og samfelagsábyrgd | B2-26 |
| Egin starvsfólk | Ja | Ja | Nei | Víst verður til Skjal 4. Politikkur fyri burðardygd og samfelagsábyrgd | B2-26 |
| Starvsfólk í virðisketuni | Ja | Ja | Nei | Víst verður til Skjal 4. Politikkur fyri burðardygd og samfelagsábyrgd | B2-26 |
| Samfelagsávirkan | Ja | Ja | Nei | Víst verður til Skjal 4. Politikkur fyri burðardygd og samfelagsábyrgd | B2-26 |
| Kundar og endabrúkarar | Ja | Ja | Nei | Víst verður til Skjal 4. Politikkur fyri burðardygd og samfelagsábyrgd | B2-26 |
| Leiðsla (atferð) | Ja | Ja | Nei | Víst verður til Skjal 4. Politikkur fyri burðardygd og samfelagsábyrgd | B2-26 |

Okkara politikkur fyri burðardygd og samfelagsábyrgd fevnir um øll hesi evnini, fyri uttan vatn- og havtilfeingi

## YVIRLIT YVIR GÓÐKENNINGAR OG UMHVØRVISSTÝRISSKIPANIR

| Góðkenningar | Stutt lýsing | Útgávudagur og gildistíð | VSME-nr. |
|---|---|---|---|
| Sertifikat PROD006-190<br>J&K Betong | Góðskugóðkenning fyri betong frá Norsk Kontrolråd: NS-EN 206:2013 + A1:2016 + NA:2017. | Leypandi dagført síðani 28.08.2017.<br>Skal endurnýggjast seinast 31.08.2026. | B1-25 |
| Umhvørvisgóðkenning<br>av J&K Betong (US) | Virksemið fevnir um:<br>1) Blanding og útkoyring av betong umframt goymslu av sementi, sandi og skervi.<br>2) Vasking av betongbilum.<br>3) Goymslu av rávørum. | Góðkent 09.07.2009. | B1-25 |
| Udstyrskontrol<br>J&K Petersen Contractors | Teknologisk institut hevur góðkent amboð og mannagongdir, ið okkara verkstað brúkar.<br>Góðkenningin er fyri eitt ár í senn. | Góðkent 26.10.2025. | B1-25 |

# FAKTA

| Upplýsingar um virksemið | VSME-nr. |
|---|---|
| J&K Petersen Contractors er millum elstu entreprenørfyritøkur í landinum og fæst við verklags- og betongarbeiði umframt bygnings-, tunla- og havnaarbeiði. | C1-47a |
| Týdningarmestu marknaðirnir hjá J&K Petersen eru bygging og menning av bygningum og av infrakervinum í Føroyum. | C1-47b |

J&K PETERSEN



**Sigtór A. Petersen**
*Stjóri*

**Anna Kalsø**
*Varastjóri*

# BURÐARDYGD Á BREDDAN

## Burðardygd er ein samfelagslig ábyrgd, sum J&K Petersen ynskir at taka í størsta álvara

Tað er okkara greiða fatan, at skal J&K Petersen standa seg í kappingini – bæði um tey bestu starvsfólkini og um tær spennandi uppgávurnar – so skal virksemið í størri mun taka hædd fyri burðardygd. J&K Petersen skal vísa dugnasemi og skynsemi í øllum sínum virksemi, tí samfelagsligt tilvit er ein partur av tilverurættinum hjá einari nútímans fyritøku.

**EYÐSÆÐ AT ARBEIÐA VIÐ SOSIALUM VIÐURSKIFTUM**

Árini 2021 og 2022 vóru búskaparliga tung hjá J&K Petersen. Hetta ávirkaði virksemið næstu árini, men vit settu nýggj mál og løgdu okkum eftir at vinna fótafestið aftur á tryggum inntøkugrundarlagi og við einum sunnum rakstri. Ein liður í hesum arbeiði var at skerja starvsfólkahópin, og hetta sæst aftur í sosialu hagtølunum.

Samstundis sum starvsfólkahópurin er minkaður, hava vit arbeitt miðvíst við javnstøðu, sjúkrafráveru og førleikamenning. Vit hava síðani 2022 lagt dent á at savna hagtøl fyri starvsfólkaøkið fyri at fáa til vega eitt dyggari dátugrundarlag, og vónandi vera hesi tølini við til at vísa framgongd í fyritøkuni í komandi árum.

Vit hava sett nýggja kós, har fakliga dugnalig og fjølbroytt starvsfólk hvønn dag loysa krevjandi arbeiðsuppgávur og taka við nýggjum avbjóðingum.

**TYKIST LANGT Á MÁL Á UMHVØRVISØKINUM**

Umhvørvistølini hjá okkum vísa, at vit í stóran mun verða ávirkað av marknaðarkreftum. Okkara vinna er stýrd av eftirspurninginum á marknaðinum, og hetta sæst aftur í, at vit hava lutfalsliga stóra orkunýtslu, tá ið vit útinna nógv og stór verklagsarbeiði, men lægri orkunýtslu og hægri tilfarsnýtslu, tá ið vit standa fyri stórum byggiverkætlanum.

Vit skulu kortini áhaldandi lyfta ábyrgdina, ið hvílir á okkum, at finna bestu og mest orkusparandi loysnirnar. Hóast vit ikki meta, at marknaðurin er búgvin til eina umlegging, har rakstrargøgn í entreprenørvinnuni – t.d. tungar maskinur – verða drivin við varandi orkukeldum, so kunnu vit arbeiða við okkara samlaðu oljunýtslu. Vit kunnu eisini leggja okkum eftir at minka elnýtsluna – og sostatt oljunýtsluna – við eitt nú at leggja orkuskipanir í arbeiðsskúrunum um frá upphiting við elriknum ovnum til hitapumpur.

J&K Petersen er eisini einasti betongframleiðari í Føroyum – og ein av fáum í Norðurlondum – sum hevur gjørt íløgu í eitt reinsiverk til restbetong. Vit hava havt nøkur ár til at menna og royndarkoyra bæði skipanina og aðrar loysnir at handfara restbetong. Sí grein um reinsiverkið á síðu 24.

Tíverri hava vit ikki nóg nógv hagtøl á ávísum umhvørvisøkjum til at vísa gongdina fleiri ár aftur í tíðina – hetta er m.a. galdandi fyri hagtølini fyri burturkast. Vit fegnast tó um, at kunngerð um burturkast vónandi er á veg, so hesi viðurskifti kunnu skipast betur. Eisini arbeiða vit við at betra mannagongdir og skipanir fyri at kunna gera eina álítandi meting av okkara óbeinleiðis $CO_2$ útláti í vavi 3.

**FULT GJØGNUMSKYGNI**

Hetta er fyrsta ESG-frágreiðingin, sum J&K Petersen greiðir úr hondum.

Fremsta endamálið við hesi fyrstu ESG-frágreiðingin er at greiða frá, hvar vit eru í dag, og fyri alment at binda okkum til at virka fyri einari burðardyggari framtíð – eitt lyfti til almenningin og okkara samstarvspartar. Hetta vilja vit fegin vísa við at gera okkara ESG-hagtøl upp eftir sokallaða VSME-leistinum, har fyritøkan velur at vísa øll tøl og ikki einans eitt úrval av føgrum tølum, tí tað kann geva eina misvísandi mynd av okkara virksemi.

Álítandi ESG-frágreiðingar skulu grundast á haldgóðar dátugrunnar og væl skipaðar mannagongdir, sum støðugt skulu mennast. Tað er eitt stórt arbeiði, men tað er eisini eitt neyðugt stig á leiðini. Vit hava nú tikið fyrsta stigið, og komandi árini halda vit fram at menna okkara dátugrunnar, so at J&K Petersen á hvørjum ári kann geva út eina dygga ESG-frágreiðing við tí endamáli at skapa yvirlit og gjøgnumskygni.

**Sigtór A. Petersen**
*Stjóri*

**Anna Kalsø**
*Varastjóri og menningarleiðari*

# INNIHALDSYVIRLIT


**02** *Frágreiðing um burðardygd*

**05** *Burðardygd á breddan*

**07** *Frágreiðing eftir VSME-leistinum*

**08** *Søgan í viðgongd og mótgongd*

**E**

**10** *Umhvørvistølini*

**16** *Umhvørvisligu fótasporini skulu minka*

**19** *Maskinparkin verður endurnýggjað*

**22** *Grønari upphiting í arbeiðsskúrunum*

**24** *Reinsiverkið hevur týðandi leiklut*

**28** *Burðardyggari bygging og útlátsfrí byggipláss*

**S**

**32** *Sosialu tølini*

**38** *Umskipan og broytingar á starvsfólkaøkinum*

**44** *Starvsfólkaheilsa og arbeiðsheilsa í skipaðum kørmum*

**46** *Eygleiðingarkortið eitt týðandi amboð*

**G**

**48** *Leiðslutølini*

**50** *Burðardygg menning krevur miðvísa leiðslu*

**52** *Kvinnuligir leiðarar í einari mannfólkaverð*

**56** *Stuðul til ítrótt, mentan, list og vælgerandi endamál*

**58** *J&K Petersen leggur dent á varandi vinnu*

**60** *Váttan frá óheftum grannskoðara*


J&K PETERSEN



# FRÁGREIÐING EFTIR VSME*-LEISTINUM

## ESG-frágreiðingar eftir VSME-leistinum hava m.a. tann fyrimun, at vit lættari kunnu samanbera okkum við aðrar fyritøkur, sum nýta VSME-leistin

J&K Petersen er partur av netverkinum Varandi Vinna. Netverkið eggjar smáum og miðalstórum fyritøkum til at nýta VSME-leistin til ESG-frágreiðingar. Fyritøkurnar gera sostatt sjálvar av, um tær nýta VSME-leistin, sum er ein felags karmur at greiða frá burðardygd. Tá ið vit nýta VSME-leistin, tryggja vit okkum, at vit arbeiða eftir einum leisti, sum ein stórur partur av føroyska vinnulívinum tekur undir við. Ein annar ágóði er, at okkara tøl kunnu samanberast við fyritøkur í øðrum londum, sum eisini nýta VSME-leistin. Hetta styrkir bæði gjøgnumskygni og samstarv innan burðardygd.

Vit eru enn á byrjanarstigi, tá talan er um ESG-frágreiðingar, og tí hava vit valt at byggja frágreiðingina upp eftir VSME-grundleistinum, men eisini lutvíst grundað á víðkaða leistin. Henda tilgongdin hevur við sær, at vit longu nú kunnu bera fram týdningarmiklar skipaðar upplýsingar, hóast ein fullfíggjað frágreiðing kemur í einum seinni umfari. J&K Petersen er í framleiðsluvinnuni, og sambart VSME-leistinum verður mælt til at upplýsa okkara tilfarsnýtslu. Í ár hava vit valt at upplýsa 5 vørubólkar, sum hava týdning í okkara framleiðslu. Við hesum upplýsingum økja vit gjøgnumskygni og møguleika at samanbera okkara ávirkan við ávirkanina frá øðrum fyritøkum í somu vinnu.

Vit upplýsa øll lyklatølini eftir grundleistinum, og nøkur lyklatøl eftir víðkaða leistinum.

Harafturat hava vit valt at upplýsa sjálvboðin lyklatøl, sum betur lýsa støðuna hjá okkum. Dømir um hetta eru dátur um lærlingar og útbúgvingartímar fyri hvørt ársverk, har tímarnir hjá lærlingunum eru drignir frá.

**HVAT ER BURÐARDYGD?**
Hugtakið burðardygd kann skilmarkast sum „førleikin at nøkta tørvin hjá núverandi ættarliði – uttan at førleikin hjá komandi ættarliðum at nøkta sín tørv verður settur í váða". Hetta fevnir um at hava fyrilit fyri Umhvørvi, Fólki og Búskapi – ofta nevnt tær tríggjar súlurnar innan Burðardygd. Á enskum kallast hetta The Tripple Bottom Line, har tær tríggjar súlurnar nevnast PPP: *People, Profit og Planet.*




**VSME stendur fyri Voluntary Sustainability Reporting Standard for Non-Listed Micro-, Small-, and Medium-Sized Enterprises, og er ein sjálvboðin ES-leistur frá 2024.*

- **1948** – Virksemið hjá felagnum byrjar á Sandoynni
- **1975** – Brøðurnir John og Kristian Anfinn Petersen taka yvir
- **1988** – P/F J&K Petersen Contractors verður sett á stovn
- **1991** – Ragnhild Arnóra Petersen „Guggan“ tekur við sum stjóri
- **2011** – Stein Olvur Petersen tekur við sum stjóri
- **2017–2018** – Umsetningur og starvsfólkahópur tvífaldast
- **2021–2022** – Í fíggjarliga truplari gongd
- **2022** – Sigtór A. Petersen verður settur sum stjóri
- **2023** – Umskipan og framgongd
- **2024–2025** – Áhaldandi góð fíggjarlig úrslit og lunnar lagdir undir arbeiðið við burðardygd

# SØGAN Í VIÐGONGD OG MÓTGONGD

**J&K Petersen hevur verið týðandi partur av føroysku byggi- og verklagsvinnuni í stívliga hálva øld bæði i góðum og ringum tíðum – nú er komin nýggj tíð á burðardyggari kós**

J&K Petersen hevur røtur aftur til 1948, tá fyritøkan byrjaði við lastbilakoyring á Sandoynni. Í 1975 yvirtóku brøðurnir, John og Kristian Anfinn Petersen, raksturin, og tá fór felagið undir entreprenørarbeiði. Hetta árið verður í dag roknað sum stovningarárið hjá J&K Petersen, sum sostatt hevur virkað í føroysku byggi- og verklagsvinnuni í meira enn 50 ár.

Í 1990'unum varð J&K Betong sett á stovn, og tað styrkti bæði framleiðsluna og kjarnuvirksemið hjá felagnum. Í 1991 tók Ragnhild Arnóra Petersen, nevnd Guggan, við sum stjóri, og hon stóð á odda fyri fyritøkuni í 20 ár. Við henni sum stjóra gjørdist J&K Petersen fyrsta stóra føroyska entreprenørfyritøka við einari kvinnu í ovastu leiðsluni. Hetta var eitt slóðbrótandi stig í einari vinnu, har menn vanliga ráddu fyri borgum.

**VØKSTUR OG AVBJÓÐINGAR**

Í 90'unum – serliga í fyrru helvt av hesum tíggjuáraskeiði – var lítið virksemi í Føroyum, tí landið var í svárari fíggjarligari kreppu. Hóast tung kreppa rakti alt samfelagið meint, megnaði J&K Petersen at halda fast og yvirliva. Leiðslan var skynsom, men eisini nýhugsandi, og fyritøkan bjóðaði m.a. upp á arbeiðir í Íslandi, har nógv virksemi var í 90'unum.

Beint fyri aldarskiftið flutti J&K Petersen til Havnar, tí verkætlanir á meginøkinum fingu alt størri týdning fyri raksturin.

Í 2017–2018 tvífaldaðist starvsfólkahópurin. Vøksturin var 100% organiskur, og umsetningurin øktist eisini 100%.

Í 2021–2022 kom J&K Petersen í fíggjarligar trupulleikar, og fyritøkan hevði hesi bæði árini tilsamans slakar 70 milliónir krónur í halli fyri skatt. Hetta bar við sær eina grundleggjandi umskipan í 2023, har leiðslan miðvíst raðfesti kapitalumleggingar, rationaliseringar og tætt samstarv við fíggingarstovnar fyri at fáa raksturin aftur á beint. Ein nýggj leiðsluskipan varð sett í verk – ein sameining av miðsavnandi rakstrarstýring og spjaddari verkætlanarábyrgd. Henda leiðsluskipan legði lunnar undir ein greiðari og meira haldføran rakstur.

Í 2023 hevði J&K Petersen 7,7 milliónir krónur í avlopi fyri skatt, og tað var ein staðfesting av nýggju kósini, og at J&K Petersen hevði vunnið fótafestið aftur.

**2024 – NÝGGJ TÍÐ Á BURÐARDYGGARI KÓS**

Ársúrslitið í 2023 var partvíst merkt av umskipanum og frásølu av ognum. Í 2024 hevði J&K Petersen aftur yvirskot, men nú var talan um ein enn betri rakstur innan kjarnuvirksemið hjá fyritøkuni, sammett við 2023. Góða gongdin helt fram í 2025, sum hevur verið eitt tað besta roknskaparárið hjá J&K Petersen nakrantíð.

Í 2024 gjørdist J&K Petersen limur í netverkinum Varandi Vinna, og harvið tók fyritøkan eitt týðandi stig á burðardyggu kósini.

Leiðslan hevur í dag ein virkishátt, har dentur verður lagdur á heildina, so at fíggjarligt avlop, burðardygd og sosial átøk verða skoðað í einum samanhangi. J&K Petersen er ein lønandi fyritøka, og málið er eisini at gerast enn burðardyggari, har fíggjarlig, umhvørvislig og sosial fyrilit skapa úrslitini og heildarmyndina.


DHA 600 S

# UMHVØRVISTØLINI

*Grundár: 2024*

## Lýsing av orkunýtsluni — Talva 8

| Orkunýtsla | Eind | 2025 | 2024 | 2023 | 2022 | VSME-nr. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fossil brennievni | MWh | 6.367 | **7.718** | 7.629 | 10.528 | B3-29 |
| Grøn/varandi brennievni | MWh | 0 | **0** | 0 | 0 | B3-29 |
| **Brennievni í alt** | **MWh** | **6.367** | **7.718** | **7.629** | **10.528** | **B3-29** |
| Fossil elnýtsla | MWh | 330 | **198** | 194 | 235 | B3-29 |
| Varandi elnýtsla | MWh | 232 | **240** | 192 | 233 | B3-29 |
| **Elnýtsla í alt** | **MWh** | **562** | **438** | **386** | **468** | **B3-29** |
| Fossil fjarhitanýtsla | MWh | 126 | **144** | 132 | 170 | B3-29 |
| Varandi fjarhitanýtsla | MWh | 84 | **87** | 81 | 76 | B3-29 |
| **Fjarhitanýtsla í alt** | **MWh** | **210** | **231** | **214** | **246** | **B3-29** |
| **Samlað orkunýtsla** | **MWh** | **7.139** | **8.387** | **8.228** | **11.242** | **B3-29** |
| Varandi orkukeldur í alt | MWh | 316 | **327** | 273 | 309 | B3-29 |
| Varandi orkukeldur í % | % | 4,4% | **3,9%** | 3,3% | 2,8% | Sjálvboðin upplýsing |

## Yvirlit yvir útlát í vavi 1 og 2 — Talva 9

| Útlát | Eind | Mál 2030 | 2025 | 2024 | 2023 | 2022 | 2021 | 2020 | 2019 | VSME-nr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| $CO_2$e vav 1 | Tons $CO_2$e | | 1.816 | **2.091** | 1.865 | 2.541 | 3.528 | 3.614 | 6.058 | B3-30a |
| $CO_2$e vav 2 (location-based) | Tons $CO_2$e | | 182 | **148** | 154 | 192 | 83 | 93 | 80 | B3-30b |
| **Samlað $CO_2$e vav 1 og 2** | **Tons $CO_2$e** | **-50%** | **1.998** | **2.240** | **2.019** | **2.733** | **3.610** | **3.707** | **6.138** | **B3-30 og C3-54** |
| $CO_2$e-intensitetur | Tons $CO_2$e/t. evrur | | 0,07 | **0,06** | 0,04 | 0,08 | 0,11 | 0,09 | 0,15 | B3-31 |
| $CO_2$e-intensitetur, ársverk | Tons $CO_2$e/ársverk | | 19,95 | **20,45** | 15,37 | 18,98 | | | | Sjálvboðin upplýsing |

## Yvirlit yvir dálkingarevni — Talva 11

| Evni | Markvirði | Slag av dálking | Vav av dálking í 2024 og 2025 | VSME-nr. |
|---|---|---|---|---|
| Olja (mineral) | Í mesta lagi 10 mg/l | Spillvatn | Ongin dálking staðfest í 24 og 25, sýn verður gjørt í 2026 | B4-32 |
| Olja/feitt | Í mesta 50 mg/l | Spillvatn | Ongin dálking staðfest í 24 og 25, sýn verður gjørt í 2026 | B4-32 |
| Botnfelliligt evni | Í mesta 10 mg/l | Spillvatn | Ongin dálking staðfest í 24 og 25, sýn verður gjørt í 2026 | B4-32 |
| pH | Millum 6-10 | Spillvatn | Ongin dálking staðfest í 24 og 25, sýn verður gjørt í 2026 | B4-32 |
| Betongdust | Í mesta lagi 25 mg dust/m$^3$ luft | Luft | Ongin dálking staðfest í 24 og 25, sýn verður gjørt í 2026 | B4-32 |

## Yvirlit yvir virksemi og serliga viðbrekin økir — Talva 12

| Staðseting | Vídd, m2 | Øki við viðbreknum lívmargfeldi | VSME-nr. |
|---|---|---|---|
| Einki øki, vit eiga ella leiga, er skrásett sum viðbrekið øki ella nærri enn 100 m við viðbrekið øki. | | | B5-33 |

## Lendisnýtsla — Talva 13

| Slag av øki | Adressa | Vídd 2025 | Vídd 2024 | VSME-nr. |
|---|---|---|---|---|
| Fastbygt lendi | á Hjalla 11, 188 Hoyvík | 2.709 | 2.709 | B5-34 |
| Fastbygt lendi | á Hjalla 13, 188 Hoyvík | 3.521 | 3.521 | B5-34 |
| Fastbygt lendi | á Hjalla 16, 188 Hoyvík | 4.478 | 4.478 | B5-34 |
| Fastbygt lendi | á Hálsi 6, 380 Sørvágur | 642 | 642 | B5-34 |
| Fastbygt lendi | á Høvdanum 13, 186 Sund | 3.800 | 3.800 | B5-34 |
| Fastbygt lendi | ytra Bryggja 6, 370 Miðvágur | 13.170 | 13.170 | B5-34 |
| Fastbygt lendi | Tinghúsvegur 67, 100 Tórshavn | 378 | 378 | B5-34 |
| Samlað lendisnýtsla, m$^2$ | | 28.698 | 28.698 | B5-34a |
| Samlað vídd av fastbygdum lendi (innsiglað) | | 28.698 | 28.698 | B5-34b |
| Samlað vídd av náttúruøki á okkara virkisøki | | 0 | 0 | B5-34c |
| Samlað vídd av náttúruøki uttanfyri okkara virkisøki | | 0 | 0 | B5-34d |

## Vatn tikið úr náttúruni og vatnnýtsla — Talva 14

| Vatnnýtsla | Mál 2030 | 2025 | 2024 | VSME-nr. |
|---|---|---|---|---|
| Samlað nøgd av vatni tikið úr náttúruni | | n/a | n/a | B6-35 |
| Nøgd av vatni tikið úr náttúruni frá økjum við vatnmangli | | n/a | n/a | B6-35 |
| Samlað vatnnýtsla | **Málið er at kunna máta vatnnýtsluna** | n/a | n/a | B6-36 |
| Vatnnýtsla í økjum við vatnmangli | | n/a | n/a | B6-36 |

## Burturkastnøgdir greinaðar eftir viðgerð — Talva 15

| Burturkast | Eind | Mál 2030 | 2025 | 2024 | 2023 | 2022 | VSME-nr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Endurnýtsla ikki-serburturkast | Tons | **+20% endurvinning/endurnýtlsu** | n/a | **n/a** | n/a | n/a | B7-38a+b |
| Endurnýtsla serburturkast | Tons | | n/a | **n/a** | n/a | n/a | B7-38 |
| Endurvinning ikki-serburturkast | Tons | | 2,0 | **36,7** | 22,4 | 1,7 | B7-38 |
| Endurvinning serburturkast | Tons | | 0,0 | **0,0** | 0,0 | 0,0 | B7-38 |
| Brenning ikki-serburturkast | Tons | **-40%** | 162,9 | **250,4** | 226,3 | 247,5 | B7-38 |
| Brenning serburturkast | Tons | | 2,9 | **1,0** | 0,0 | 5,0 | B7-38 |
| Tyrving ikki-serburturkast | Tons | **-40%** | 956,1 | **697,1** | 23,6 | 145,3 | B7-38 |
| Tyrving serburturkast | Tons | | 0,0 | **0,0** | 0,0 | 0,0 | B7-38 |
| Samlað nøgd av burturkasti | Tons | | 1.123,9 | **985,2** | 272,3 | 399,6 | B7-38 |

## Burturkastnøgdir greinaðar á ymsu bólkarnar — Talva 16

| Burturkast | Eind | Serburturkast | 2025 | 2024 | 2023 | 2022 | VSME-nr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Endurnýtsla** | | | | | | | |
| Einki skrásett | | | Einki skrásett | **Einki skrásett** | Einki skrásett | Einki skrásett | B7-38 |
| **Endurvinning** | | | | | | | |
| Jarn og metal | Tons | Nei | 1,8 | **34,9** | 19,2 | 1,4 | B7-38 |
| Papp og pappír | Tons | Nei | 0,2 | **1,7** | 3,2 | 0,4 | B7-38 |
| **Brenning** | | | | | | | |
| Blandað | Tons | Nei | 161,9 | **248,5** | 223,6 | 239,0 | B7-38 |
| Dekk | Tons | Nei | 1,0 | **1,9** | 2,7 | 8,5 | B7-38 |
| Spillolja | Tons | Ja | 2,9 | **1,0** | 0,04 | 5,0 | B7-38 |
| Máling | Tons | Nei | 0,0 | **0,0** | 0,2 | 0,0 | B7-38 |
| **Tyrving** | | | | | | | |
| Blandað at tyrva | Tons | Nei | 4,3 | **161,2** | 22,9 | 19,9 | B7-38 |
| Evja | Tons | Nei | 0,0 | **14,3** | 0,01 | 66,3 | B7-38 |
| Tungt at tyrva | Tons | Nei | 917,3 | **516,6** | 0,7 | 59,1 | B7-38 |
| Stein- og glasull | Tons | Nei | 13 | **2,8** | 0,0 | 0,0 | B7-38 |
| Gips | Tons | Nei | 15,8 | **2,3** | 0,0 | 0,0 | B7-38 |
| Asbest og eternit | Tons | Nei | 5,7 | **0,0** | 0,0 | 0,0 | B7-38 |

## Tilfarsnýtsla

Talva 17

| Týðandi tilfar hjá felagnum | 2025 | 2024 | 2023 | 2022 | VSME-nr. |
|---|---|---|---|---|---|
| Grót og skervur (tons) – betongframleiðsla og onnur framleiðsla | 4.548 | **23.332** | 42.589 | 56.149 | B7-38c |
| Sement (tons) – betongframleiðsla | 3.473 | **5.277** | 10.324 | 7.357 | B7-38c |
| Microsilica (tons) – betongframleiðsla | 50 | **46** | 216 | 251 | B7-38c |
| Sandur (tons) – betongframleiðsla og onnur framleiðsla | 3.440 | **19.009** | 35.838 | 29.446 | B7-38c |
| Armeringsjarn (tons) – onnur framleiðsla | 143 | **62** | 202 | 621 | B7-38c |



# UMHVØRVISLIGU FÓTASPORINI SKULU MINKA

**Seinnu árini hevur J&K Petersen tikið miðvís stig fyri at minka umhvørvisligu slóðina, sum fyritøkan leggur eftir seg**

**SAMLAÐ ORKUNÝTSLA Í MWh**




Lyklatølini í ESG-frágreiðingini vísa, hvussu J&K Petersen arbeiðir við umhvørvisligari burðardygd, og hvørji mál vit seta okkum. Vit virka í einari vinnu, har rakstur og orkunýtsla eru tætt knýtt at tungari maskinútgerð og tilfarsnýtslu. Tí er tað okkara greiða útgangsstøði, at vit mugu arbeiða miðvíst og langskygt fyri at minka okkara umhvørvisligu fótaspor – eisini tá tað krevur broytingar í siðvenjum, rakstri og arbeiðsgongdum á byggiplássum kring landið.

**ORKUNÝTSLA**

Seinastu árini hava vit tikið ítøkilig stig fyri at betra orkumyndina. Sum dømi kann nevnast, at vit í 2024 løgdu upphitingina í nøkrum av okkara arbeiðsskúrum um til hitapumpur. Tað hevði við sær bíligari rakstur og orkusparing samanborið við elovnarnar, sum frammanundan vóru brúktir til at hita skúrarnar.

*FOSSIL BRENNIEVNI*

Eins og nevnt í innleiðingini, verða vit í stóran mun ávirkað av marknaðarkreftum. Okkara vinna er stýrd av eftirspurninginum á marknaðinum, og hetta sæst aftur í, at vit hava lutfalsliga stóra orkunýtslu, tá ið vit útinna nógv og stór verklagsarbeiði, men lægri orkunýtslu og hægri tilfarsnýtslu, tá ið vit standa fyri stórum byggiverkætlanum. Mongdin av fossilum brennievni sveiggjar ár um ár, og júst í 2025 er nøgdin lægri, sammett við undanfarin ár. Orsøkin liggur bæði í øktum framleidni, tí fleiri tung amboð eru skift út í 2024 og 2025, men eisini tí vit hava havt færri tungar maskinur í nýtslu.

Hóast vit ikki altíð hava ávirkan á, hvørji sløg av arbeiðum vit fáa, kunnu vit arbeiða ábyrgdarfult. Tað gera vit til dømis við at halda maskinparkina við líka, skifta hitaskipanir og arbeiða við tómgongd. Les meira um, hvussu vit arbeiða við hesum málum í greinum á næstu síðunum.

Í 2026 seta vit í verk ein nýggjan tómgongdarpolitikk, har málið er at minka tímatalið, har maskinur ganga í tómgongd, við einari helvt næstu árini. Hetta verður gjørt við greiðum leiðreglum, førleikamenning og eftirmetingum, tí vit vita, at stórir menningarmøguleikar liggja í júst hesi broytingini – bæði umhvørvisliga og fíggjarliga. Tómgongdarverkætlanin er júst byrjað, og vit almannakunngera úrslitini av hesi verkætlanini í ESG-frágreiðingini fyri 2026.

*ELNÝTSLA*

Sammett við okkara oljunýtslu, sum lækkaði í 2025, er elnýtslan støðugt vaksin tey seinastu árini. Ein partur av orsøkini er, at vit hava útvegað okkum fleiri skúrbýlingar, sum allir eru hitaðir við elorku. 70% av okkara skúrum eru framvegis hitaðir við elovnum. So hvørt vit skifta skúrarnar út, leggja vit dent á at velja orkusparandi hitaloysnir – hetta fyri at minka um óbeinleiðis oljunýtslu (E), hava javnari inniluft (S) og spara rakstrarútreiðslur (G).

**VATNNÝTSLA**

Hóast vatntrot ikki er ein avbjóðing í Føroyum, ynskja vit at leggja dent á at brúka alt tilfeingið skynsamt.

## LUTFALL VARANDI ORKUKELDUR




Lægri oljunýtsla hevur ført til, at lutfallið av varandi orku er økt.



Grundleisturin í VSME mælir til, at feløg upplýsa vatnnýtsluna, men vegna vantandi tøl á hesum øki, eru vit ikki før fyri at lúka tær treytirnar enn. Vit hava sum mál at skráseta alla okkara vatnnýtslu innan 2030.

Á nøkrum økjum arbeiða vit longu skynsamt við vatnnýtsluni. Okkara reinsiverk til restbetong endurnýtir nevniliga alt vatnið, sum verkið brúkar. Tú kanst lesa meira um okkara reinsiverk seinni í frágreiðingini.

**BURTURKAST**
Góð og eftirfarandi hagtøl á burturkastsøkinum eru ein avbjóðing fyri okkum eins og fyri aðrar fyritøkur. IRF og KB nýta ymiskar mannagongdir og skipanir at skráseta burturkast. Stutt sagt, burturkastið verður ikki skrásett eins – og heldur ikki altíð „rætt". Sama „vøra" kann í dag skrásetast í t.d. kilo, rúmd, litrum, og metrum, eins og sama „vøra" eisini kann skrásetast sum ymiskar „vørur" á ymiskum móttøkustøðum, tí somu mannagongdir vera ikki nýttar.

Í dag er neyðugt at umrokna fyri at umskipa metrar, rúmd, litrar og stykkir til kilo, og úrslitið er, at neyvleikin hvørvur.

Fyri at framleiða góð hagtøl, má alt burturkastið skrásetast rætt og í somu eind, nevniliga í kilo.

Tað er tó gleðiligt, at økið er í menning. Nýggj kunngerð um burturkast er vónandi á veg, og har verður mælt til, at alt burturkast verður skrásett sambært EWC-kotum (European Waste Codes). Talan er um ein altjóða leist fyri skráseting av burturkasti, og skráseting sambært EWC-leistinum eigur at tryggja, at alt burturkast verður skrásett rætt og á sama hátt. Eisini verður tryggjað, at vit brúka sama leist sum grannalondini.

Um kunngerðin skal virka eftir ætlan, er tó neyðugt, at ávís viðurskifti verða fingin í rættlag. Tað mest umráðandi er, at tillagingar verða gjørdar til KT-skipanir og mannagongdir, og at móttøkustøðini gera íløgur í vektir.

Í framtíðini vænta vit tí at kunna vísa neyv hagtøl, so vit eisini fáa eitt betri grundarlag at broyta okkara egnu atferð.

Meðan vit bíða, eru vit hjá J&K Petersen farin undir tvær royndarverkætlanir, har vit á tveimum byggiplássum leggja dent á at skilja burturkastið í fleiri bólkar. Her leggja vit okkum eftir at lúka krøvini í komandi kunngerðini um burturkast, og vit leggja áherðslu á, at sum minst av burturkasti verður tyrvt ella brent, og at størri partur sostatt fer til endurvinningar.

**TILFAR**
Grundleisturin í VSME mælir til, at ein fyritøka í einari tilfarstungari vinnu, skal upplýsa vørubólkar, sum hava størst týdning fyri virksemið. Tað er vert at nevna, at tá ein arbeiðstakari upplýsir lyklatøl um tilfarsnýtslu í eini ESG-frágreiðing, endurspeglar hetta ofta avgerðir og snið, sum eitt nú byggiharrar, ráðgevar og arkitektar hava valt tíðliga í tilgongdini, heldur enn tey val, ið eru tikin undir sjálvari bygginini.

Í hesari frágreiðing hava vit valt at upplýsa fimm vørubólkar, sum vit nýta í okkara framleiðslu. Vit arbeiða við at kunna upplýsa fleiri og meira eftirfarandi tøl og bólkar, so hvørt sum árini líða. Hetta hjálpir okkum at fáa eina greiðari fatan av ávirkanini av okkara virksemi, sjálvt um vit ikki altíð hava tikið lut í avgerðini um val av tilfari. Vert er eisini at hava í huga, at hóast mongdirnar eru stórar í summum vørubólkum, sum eitt nú í gróti og skervi, er talan ikki um vørubólkar, ið verða mettir sum dálkandi, tá hugt verður at Life-Cycle Assessment (LCA), sum er ein lívsringrásargreining fyri vørur.

Umhvørvislig ábyrgd er ikki ein einstøk verkætlan, men ein støðug tilgongd, har vit arbeiða við at minka um okkara ávirkan á náttúruna. Við ítøkiligum stigum innan orkunýtslu, fossil brennievni, elnýtslu, vatn, burturkast og tilfarsnýtslu seta vit karmar fyri burðardyggari loysnum. Hóast avbjóðingar, halda vit fast um okkara mál, sum er at arbeiða miðvíst og langskygt við at betra okkara umhvørvismynd. Í komandi árum fara vit at styrkja skráseting, arbeiða við menning og seta í gildi nýggjar mannagongdir, so vit kunnu vísa á neyv úrslit og skapa varandi broytingar – bæði fyri náttúruna og fyri okkara virksemi.

*Í framtíðini vænta vit tí at kunna vísa neyv hagtøl, so vit eisini fáa eitt betri grundarlag at broyta okkara egnu atferð*

# MASKINPARKIN VERÐUR ENDURNÝGGJAÐ

**Maskinparkin hjá J&K Petersen verður endurnýggjað við støði í einari burðardyggari heildarmeting, sum er grundað á kostnað, arbeiðsumstøður, útlát og orkunýtslu**

Fíggjarliga tungu árini hjá J&K Petersen, 2021 og 2022, elvdu til, at íløgumegin hjá felagnum varð sera avmarkað. Samstundis var maskinparkin sera slitin og hevði fleiri maskinur, sum ikki longur vóru álítandi ella nóg virðisskapandi til at geva eitt lønandi ískoyti til dagliga raksturin.

Tí var neyðugt at taka støðu til, hvussu ein endurnýggjan av maskinparkini skuldi fara fram. Fyri eitt framleiðsluvirki hevur hetta arbeiðið stóran strategiskan týdning, tí maskinparkin hevur beinleiðis ávirkan á bæði framleiðslu, arbeiðsumstøður og umhvørvi.

Vit hava lagt dent á at brúka veitarar, sum kunnu útvega amboð við bestu góðsku og



rakstrartrygd. Maskinurnar verða sostatt skiftar út við støði í einari burðardyggari heildarmeting:

- **Kostnaður (Profit)**
  Langtíðarsparing í rakstri og kostnaði fyri viðlíkahald, m.a. lægri orkunýtslu og skipanir, sum boða frá møguligum brekum, áðrenn maskinan steðgar upp.

- **Arbeiðsumstøður hjá starvsfólkum (People)**
  Betri arbeiðsumstøður í maskinuni, minni larmur og ristingar, betri komfort og útsýni – samanumtikið betri arbeiðsumhvørvi.

- **Útlát og orkunýtsla (Planet)**
  Minni $CO_2$-útlát, tí motorurin og tøknin eru virknari og nýtslan minni, umframt ein KT-skipan, sum skrásetir tómgongd, orkunýtslu og gevur verkstaðnum boð um viðlíkahald.

**LÍVSTÍÐIN HJÁ MASKINUM**

Tað er ein meginregla, at maskinur verða skiftar út, tá ið tær eru brúktar í 10.000 tímar ella sjey ár. Tá hesi stóramboð hava koyrt í meira enn 10.000 tímar, er vanligt, at rakstrartrygdin minkar, og at útreiðslurnar til viðlíkahald hækka. Amboð, sum eru eldri enn sjey ár, hava ofta nógv lægri restvirði, tí tey eru ikki tíðarhóskandi í einari vinnu, sum støðugt mennist.

Tað er tó ikki altíð tann burðardyggasta loysnin at skifta maskinuna út. Amboð, sum eru væl viðfarin og javnan hildin við líka, kunnu hava munandi longri livitíð enn 10.000 tímar og/ella sjey ár. Vit mugu eisini hava í huga, hvørji amboð krevjast til arbeiðini, sum vit átaka okkum. J&K Petersen leggur tí dent á at finna eina javnvág millum rakstrartrygd, fíggjarliga ábyrgd og burðardygga nýtslu av okkara tilfeingi.

Øll amboð í okkara maskinpark koma tó fyrr ella seinni til „end-of-life“. Á næstu síðu sæst eitt dømi um, hvussu tríggjar nýggjar maskinur hava bøtt um trivnaðin hjá starvsfólkum, minkað um umhvørvisárin og samstundis tryggjað ein fíggjarliga skynsamari rakstur.

*Tað er eitt mál hjá J&K Petersen at gera burðardyggar heildarmetingar, tá nýggj amboð skulu útvegast, ella gomul skiftast út*



# ESG-SAMANBERINGAR

## BORIVOGNAR





**ATLAS COPCO SMARTROC T45**
2016

**EPIROC SMARTROC T40-11**
2024

Hóast SmartROC T45 (2016) framvegis er álítandi – um maskinan verður væl røkt – lýkur hon ikki tøkniliga dagsins ESG-krøv. SmartROC T40-11 (2024) hevur greiðan fyrimun bæði búskaparliga, umhvørvisliga og sosialt.

- **Búskaparliga:** Hevur lægri brennievnisnýtslu og nútímans telematikk, sum hevur við sær hægri effektivitet í allari livitíðini, hóast keypsprísurin er hægri.
- **Umhvørvisliga:** Stage V-motorurin minkar munandi um útlát av $NO_x$ og partiklum. Brennievnisnýtslan pr. boraðan metur er nógv lægri, og $CO_2$-útlát pr. hol minkar samsvarandi.
- **Sosialt/Ergonomiskt:** Kabinan er sniðgivin, so trygd og trivnaður hjá føraranum eru betri.

## GRAVIMASKINUR





**CAT 329EL**
2013

**CAT 330**
2025

CAT 330 (2025) stendur seg betur enn CAT 329E L (2013) á øllum trimum ESG-mátum.

- **Búskaparliga:** Lægri kostnaður til viðlíkahald og upp í 20% hægri brennievnisvirknaður.
- **Umhvørvisliga:** Betri hydraulikkur og elektrohydrauliskt stýri. 20% lægri brennievnisnýtsla og minni $CO_2$-útlát.
- **Sosialt/Ergonomiskt:** Betri komfort, betri útsýni og meira framkomin tøkni, sum er føraranum til hjálpar.

## DUMPARAR





**CAT 730C**
2015

**CAT 730**
2022

Tá vit samanbera dumpararnar CAT 730C (2015) og CAT 730 (2022), vísir nýggjara amboðið munandi betri ESG-avrik undir somu arbeiðsumstøðum.

- **Búskaparliga:** Meiri rakstrartíð og lægri kostnaður til viðlíkahald.
- **Umhvørvisliga:** Strangari útlátskrøv og upp í16% hægri brennievnisvirknaður.
- **Sosialt/Ergonomiskt:** Friðarligari kabina, betri útsýni og betri komfort.

Dømini vísa, at nýggjaru amboðini brúka minni brennievni, og at kostnaðurin til viðlíkahald eisini er minni. Harumframt eru tey optimerað til at taka hædd fyri umhvørvinum, og arbeiðsumstøðurnar hjá føraranum eru munandi betri. Samanumtikið er talan um lægri rakstrarkostnað í livitíðini, minni $CO_2$-útlát og eitt burðardyggari og sum heild høgligari arbeiðsumhvørvi.

# GRØNARI UPPHITING Í ARBEIÐSSKÚRUNUM

**J&K Petersen ætlar, sum frá líður, at hita allar arbeiðsskúrar við grønari og orkusparandi hitaloysnum**

J&K Petersen hevur givið verkætlanarleiðarum betri innlit í øll viðurskifti í fyritøkuni – eisini í orkunýtsluna á arbeiðsplássum. Hetta er ein liður í arbeiðinum at skapa ein munadyggari rakstur.

Tá Hilbert fekk ábyrgd av stóra manningarskúrinum við flogvøllin í Sørvági, varð skúrurin hitaður við el-ovnum. Teljarin vísti høga nýtslu, og Hilbert gjørdi eina fíggjarætlan, sum hann legði fyri leiðsluna. Hilbert fekk játtan til at keypa tvær hitapumpur til skúrin.

Ein veitari á staðnum setti eftir stutta tíð hitapumpurnar upp. Úrslitið sást beinanvegin – elnýtslan minkaði munandi. Hetta er eitt dømi um, hvussu vit við meira gjøgnumskygni og skjótum átøkum kunnu betra raksturin og gera okkurt munagott fyri umhvørvið. Vit fara tí frameftir at kanna, hvørjar grønar og orkusparandi loysnir eru hóskandi til at hita okkara skúrar.

*CASE'IN HJÁ HILBERT:*

- 1. mars 2024 vórðu hitapumpurnar tiknar í nýtslu
- Í miðal verða 46% færri kWt brúktir, tá ið vit brúka hitapumpur, sammett við el-ovnar
- Grøna økið vísir brúktar kWt + 46%, sum hevði verið nýtslan, um vit ikki høvdu skift til hitapumpur
- Bláa økið vísir staðfestu nýtsluna við hitapumpum

**ORKUNÝTSLA Í kWh 2023–2025**



Í løtuni vera 45% av fermetrunum í skúrunum hjá J&K Petersen, sum eru í nýtslu, hitaðir við hitapumpum. Í 2025 fór eitt greiningararbeiði í gongd fyri at kanna, í hvørjum skúrum tað loysir seg at leggja um til grønari orkuskipanir. Tað er nevniliga ikki altíð ein fyrimunur við slíkari umlegging. Um ein skúrur skal skiftast út innan ávíst tíðarskeið, er tað í summum førum betri at lata hann standa og heldur seta eina grøna orkuskipan í verk, tá ið nýggjur skúrur verður útvegaður.

Ein samlað umleggingarætlan fyriliggur við árslok 2026.

**SAMLAÐ SPARING KR.:**
148 t.kr. íroknað íløgu í hitapumpu (195 t.kr. í el-nýtslu).

**SAMLAÐ SPARING $CO_2$:**
30 tons $CO_2$ frá mars 2024 til desemeber 2025.

**ORKUSKIPANIR Í ARBEIÐSSKÚRUNUM**







J&K PETERSEN

# REINSIVERKIÐ HEVUR TÝÐANDI LEIKLUT

**Reinsa, endurvinna og stoypa – heldur enn at tyrva. Soleiðis handfara vit restbetong, og her hevur okkara reinsiverk avgerandi týdning**

Betong er heimsins mest brúkta byggitilfar – men eisini eitt tilfar við høgum $CO_2$–útláti. J&K Petersen framleiðir hvønn dag betong til sínar kundar, og ein partur av betonginum kemur aftur sum restbetong.

Fyrr koyrdu vit restbetongið í ein brunn, brutu tað uppaftur og tyrvdu tað, men fyri skjótt 15 árum síðani fór J&K Petersen undir at finna skynsamari loysnir at handfara restbetong. Tá funnu vit tvær loysnir at arbeiða víðari við.

Fyrra loysnin var at gera íløgu í formar til at stoypa betongkubbar, sum kunnu brúkast til eitt nú skilaveggir og avbyrging á byggiplássum. J&K Petersen hevur stoypt betongkubbar úr restbetongi síðani 2013, men eftirspurningurin øktist munandi í 2020, og síðani tá hava kundar støðugt staðið á bíðilista fyri at fáa fatur á betongkubbar.

Í 2017 gjørdi felagið stóra íløgu í reinsiverk, sum reinsar, vaskar og endurvinnur tilfarið, sum betongið verður framleitt úr. Reinsiverkið kann taka ímóti bæði stórum og smáum nøgdum, og tað kann vera ígongd, sama hvussu veðrið er. Reinsiverkið hevur sostatt stóran týdning, tá ið vit skulu handfara restbetongið, sum ikki verður stoypt til betongkubbar.

Samanumtikið hava íløgurnar í formarnar og reinsiverkið munað væl bæði umhvørvisliga og búskaparliga, tí mest sum einki restbetong verður tyrvt longur. Sostatt hava vit í einum taki minkað nøgdirnar av burturkasti, $CO_2$-útlátið og útreiðslurnar.

**REINSIVERKIÐ OG AVLOPSTILFARIÐ**

Reinsiverkið skolar og sáldar restbetongið frá bilunum, so sandur og skervur kunnu endurvinnast. Tann fínasti parturin, sum eina mest er kálk, verður tyrvdur.

J&K Petersen hevur í fleiri ár – fyri at sleppa undan at tyrva hetta avlopið – roynt at fingið loyvi frá myndugleikunum at endurnýta avlopstilfarið í landbúnaðinum. Kálkið í avlopstilfarinum hevur tann eginleikan, at tað kann økja lága ph-virðið, sum er í føroysku moldini. Hesin møguleikin er fyribils steðgaður, tí viðgerðin hjá myndugleikunum hevur higartil verið trupul og úrslitaleysur.

Nú verður í staðin arbeitt við øðrum møguleikum, so fína tilfarið í restbetonginum kann brúkast í øðrum verkætlanum – og endamálið er greitt: „So lítið sum gjørligt skal enda sum burturkast og tyrvast". Eydnast hetta, so kann J&K Petersen fullkomiliga sleppa undan at tyrva avlopstilfarið frá restbetonginum, og sostatt verður alt tilfar, sum vit brúka í okkara betongframleiðslu, partur av ringbúskapinum.

**VIT VILJA VITA – IKKI GITA**

J&K Petersen hevur í fleiri ár stoypt betongkubbar og reinsað restbetong, og okkara fatan hevur altíð verið, at hetta er ein burðardyggari mannagongd enn at tyrva. Vit hava kortini havt tørv á einum fakligum grundarlagi at byggja hesa fatan á.





# FAKTA

**VATNNÝTSLA Í RINGRÁS**

Reinsiverkið er sniðgivið við atliti at skynsamari vatnnýtslu.

Alt vatnið verður endurnýtt, eftir at tað hevur verið ígjøgnum pressuna, sum pressar tær fínu leivdirnar av betonginum.

Ein lítil partur av vatninum fer í brunnin, sum vaskar betongrestirnar, meðan meginparturin verður goymdur í einum øðrum vatnbrunni, haðani vatnið verður nýtt til at skola betongrestir úr trumlunum á betongbilunum.

## GREINING AV ÚTLÁTI OG KOSTNAÐI




## SAMLAÐUR KOSTNAÐUR




## SAMLAÐ $CO_2$-ÚTLÁT




Á heysti 2025 var ein uttanhýsis ráðgevi settur at greina, hvørjir umhvørvisligir* og fíggjarligir ágóðar fáast burtur úr reinsiverkinum og virkseminum at stoypa betongkubbar úr restbetongi. Tríggjar ymiskar myndir vóru settar upp fyri at kunna samanbera ymiskar mannagongdir.

1. *Alt restbetong fer til tyrving*
2. *Alt restbetong verður reinsað*
3. *Alt restbetong verður stoypt til kubbar*

**Á umhvørvisøkinum hyggja vit samanlagt at bæði $CO_2$-útláti og burturkasti.*

Greiningin vísir, at besta loysnin er at stoypa alt restbetong til kubbar – bæði tá talan er um $CO_2$-útlát, tyrvingarmongd og búskap. Tað er kortini umráðandi at leggja dent á, at burðardygdin er treytað av, at kubbarnir verða eftirspurdir. Marknaðurin er neyvan óendaligur, og harafturat kann alt restbetong ikki stoypast í formum.

Í verandi støðu er tískil neyðugt við einari samansettari loysn, har vit stoypa í formum og reinsa restina, so at alt restbetongið verður avskipað á skynsamasta hátt.

Næstbesta loysnin er at reinsa betongið í okkara reinsiverki. Eins og við kubbunum, vísir henda mannagongdin, tá ið vit sammeta við tyrving, eitt greitt betri burðardygt úrslit, bæði tá talan er um $CO_2$-útlát, tyrvingarmongd og búskap.

$CO_2$-útlátið tilsamans er 56% lægri, tá ið vit reinsa restbetongið heldur enn at tyrva tað. Samstundis minkar nøgdin av burturkasti 68%, tá ið vit brúka reinsiverkið og einans tyrva avlopstilfarið.

**FRAMTÍÐIN**

Vit eru ikki stúrin um, at marknaðurin fyri betongkubbar einaferð verður mettaður, tí okkara reinsiverk vísir sera góð úrslit á umhvørvisøkinum. Vit hava eisini vónir um at fáa uppaftur meira burtur úr reinsiverkinum.

Ein $CO_2$-neutral elframleiðsla hevði havt við sær, at $CO_2$-útlátið frá reinsiverkinum minkaði enn meira. Tað kundi enntá verið talan um eitt negativt nettotal av $CO_2$-útláti, tí stórur partur av útlátinum stavar frá elnýtsluni á reinsiverkinum. Um streymurin, sum verður framleiddur út á føroyska elnetið, verður grønari, so gerst reinsiverkið eisini grønari.

Um vit harafturat ímynda okkum, at vit við tíðini finna eitt nýtsluøki til avlopið frá reinsiverkinum, kann alt tilfarið, sum verður brúkt í okkara betongframleiðslu, gerast partur av ringbúskapinum.

---

***Burðardyggasta betongið er tað, sum ongantíð er framleitt, og grønasti bygningurin er tann, sum ongantíð er bygdur***

***– Uttanhýsis ráðgevi hjá J&K Petersen***

Veruleikin er tó tann, at vit støðugt skulu halda við líka og byggja almenn rúm, reisa bústaðir til vaksandi fólkatalið og betra okkara undirstøðukervi. Og tá koma eginleikarnir hjá betonginum væl við í Føroyum. Tí er tað eisini okkara ábyrgd at minka umhvørvisárini frá betonginum og restbetonginum. Tað er orsøkin til, at vit hava tikið stig til skipanirnar, sum eru lýstar omanfyri.



### HUGLEIÐINGAR HJÁ EINUM ARBEIÐSTAKARA

# BURÐADYGGARI BYGGING OG ÚTLÁTSFRÍ BYGGIPLÁSS

**Henda hugleiðingin lýsir sjónarhornið hjá einum arbeiðstakara um burðardygd í almennum byggiverkætlanum í Føroyum, og hvat skal til, fyri at byggipláss kunnu minka útlátið og gerast útlátsfrí**

Bygningar og byggivirksemi standa fyri tilsamans 35–40% av heimsins $CO_2$-útláti.

Ein munandi partur av íbundna $CO_2$-útlátinum í hesum geiranum – 10–15% – stavar frá tíðini, áðrenn ein bygningur yvirhøvur verður tikin í nýtslu. Mett verður, at beinleiðis útlát frá byggiplássum er orsøk til 1–2% av heimsins $CO_2$-útláti.

Spurningurin er so, hvat skal til fyri at byggja burðardyggari, tá talan er um almennar byggiverkætlanir, og fyri at byggipláss kunnu gerast útlátsfrí?

**BURÐARDYGGARI BYGGING**

Hóast arbeiðstakarar hava ein høvuðsleiklut í at fremja verkætlanir á ábyrgdarfullan hátt, verða nógvar grundleggjandi avgerðir um snið og tilfar tiknar tíðliga í fyrireikingini, har byggiharrar, ráðgevar og arkitektar taka avgerðirnar. Tí endurspeglar tilfarsval og ávirkanin á umhvørvið, sum fylgir við valinum av tilfari, ofta frammanundan ásett krøv í verkætlanini, heldur enn at sjálvstøðugar avgerðir um tilfarsnýtslu verða tiknar í sjálvum byggitíðarskeiðnum.

Myndugleikar og ásettir standardir seta eisini ofta strong krøv, sum kunnu hava við sær, at tað ikki er rúm fyri nýhugsan og at spara tilfar.

**LCA OG LEIKLUTURIN HJÁ ARBEIÐSTAKARANUM**

LCA (Life Cycle Assessment) er eitt týðandi amboð at skilja og minka umhvørvisávirkanina frá byggivirksemi, og við hesum amboðnum verður tikið samanum, hvussu tilfarsval ávirkar útlátið í umhvørvinum, har bygt verður. Her verður lagt upp fyri útvinningi av rávøru, framleiðslu, flutningi, viðlíkahaldi og „end-of-life“ mannagongdum. Tað er ein meginregla, at væl upplýstar avgerðir um tilfar kunnu minka munandi um ávirkanini á umhvørvið.

LCA- metingin eigur at verða gjørd tíðliga í fyrireikingini av verkætlanini ella í sniðgevingini. Tað er her, tað ber til at ávirka mest. Snið, tilfarsval og krøv til dygd



verða vanliga ásett í útboðnum ella fyrr. Tí hvílir ein stór ábyrgd á byggiharranum og hansara ráðgevum og arkitektum á hesum stigi, tá ið hugsað verður um burðardygd. Avgerðir, sum verða tiknar tíðliga, áseta í stóran mun, hvussu verkætlanin ávirkar umhvørvið fra byrjan til enda.

Ein arbeiðstakari, ið kappast um byggiarbeiðir í almennum útboðum, kemur inn í tilgongdina, tá ið verkætlanir sum oftast í stóran mun eru lagdar í fastar karmar, áðrenn byggingin byrjar. Tá ein arbeiðstakari verður knýttur at verkætlanini á hesum stigi, er sera lítil møguleiki at ávirka tilfarsvalið, sama hvussu stór ynskini um burðardygd eru.

Tey, ið løggeva, mugu eisini ásanna sín leiklut, tá talan er um at gera skiftið til eitt burðardyggari samfelag í Føroyum møguligt. Ein útbjóðingarskipan, ið einans leggur dent á kostnaðin, fer neyvan at økja um burðardyggu bygginguna. Tá lægsti kostnaður er einasta fyrilitið, sum skal havast í huga, verða burðardygd og LCA niðurraðfest. Verandi skipan fyri útboð hevur sostatt við sær, at hetta er ov avbjóðandi, tí um ein burðardyggari loysn er dýrari, er hon sjáldan kappingarfør í almennum útboði.

### VEÐURLAGIÐ OG DYGDIN Á TILFARINUM

Føroyska veðurlagið setur ávísar avmarkingar, ið hava beinleiðis ávirkan á, hvussu leingi ymiskt tilfar heldur sær í Føroyum. Høgt vætustig, nógvur vindur, salt og áhaldandi broytingar í veðrinum hava við sær, at tilfar viknar skjótari. Loysnir, ið verða mettar at vera burðdyggar í øðrum londum, kunnu hava styttri lívstíð í Føroyum, og hetta elvir til títtari umvælingar ella útskiftingar.

Tá støði verður tikið í einum LCA-sjónarhorni, hevur haldføri stóran týdning. Tilfar, ið verður framleitt við lágum útláti, men sum hevur avmarkað haldføri, kann við tíðini vísa seg at vera minni burðardygt, tá metast skal um ávirkanina á umhvørvið. Somuleiðis kann tilfar, ið krevur serligan flutning ella viðlíkahald, hava eyka umhvørvisligar og búskaparligar kostnaðir við sær í einum oyggjasamfelag. Í ávísum førum kann meira harðført ella vanligt tilfar vera betri, tá metast skal um burðardygd.

### GONGDA LEIÐIN

Framstig krevja broytingar fyrr í virðisketuni. Um burðardygg bygging skal gerast veruleiki, so skal:

- størri dentur leggjast á LCA í verkætlanarfyrireikingini við støði í staðbundna veðurlagnum og nýtsluumstøðunum,
- lógin um útbjóðing skal eggja arbeiðstakarum at koma við øðrvísi loysnum og tryggja, at tað eisini verður mett um hesar loysnir, sjálvt um tær ikki eru tær bíligastu, og
- ein hugburðarbroyting til hjá teimum, ið taka politisku avgerðirnar.

Um ynskið er eitt meira burðardygt samfelag í Føroyum, skal langtíðardygd javnsetast við kostnað. Burðardygd í bygging verður ikki rokkin við, at tilfar verður skift út í einstøkum verkætlanum, men við avgerðum, sum taka støði í einari heildarmeting av fyrireikingum, innkeypi, og hvussu arbeiðið verður útint.

### ÚTLÁTSFRÍ BYGGIPLÁSS

Mett verður, at beinleiðis útlát á byggiplássum frá dieselmaskinum, generatorum, fyribils installatiónum og logistikki er orsøk til 1–2% av heimsins $CO_2$-útláti.

Hetta útlát er beinleiðis og staðbundið. Tað hoyrir til tað, vit kalla útlát í vavi 1. Óivað er lætt at hugsa, at tað er einfalt at gera nakað munagott fyri at minka útlátið av $CO_2$ frá byggiplássum. Men hvat skal veruliga til?

Eitt nú krevst, at ein arbeiðstakari kann leggja um til maskinur og logistikk, har varandi orka er drívmegin. Hetta krevur:

- liðilig(ari) almennar útbjóðingar, ið gera tað møguligt at raðfesta burðardyggar loysnir, eins og nevnt omanfyri,
- atgongd til tøkni, so sum elriknar maskinur ella aðrar maskinur við lágum útláti,
- sterkt elveitingarkervi, so tað er møguligt at snarløða tunga útgerð, og
- atgongd til elveitingarkervi, har varandi elorka kann veljast, raðfestast og sporast.

### UMLEGGING – VERANDI STØÐA

Ein høvuðsforðing fyri burðardygga umlegging er, at kostnaðurin fyri battarídrivnar maskinur er hægri enn kostnaðurin fyri samsvarandi dieselriknar maskinur. Hóast rakstrarkostnaðurin fyri battarídrivnar maskinur kann vera lægri, so snúgva almenn útboð seg burturav um sáttmálaprís. Tað hevur við sær, at slíkar íløgur eru minni áhugaverdar vinnuliga, tí tær elva til

verri kappingarføri. Hetta kann darva fyritøkum, ið ynskja at gera íløgur í reinari tøkni.

Stórir framleiðarar av entreprenørmaskinum – t.d. Volvo Construction Equipment og Caterpillar – bjóða nú battarídrivnar gravimaskinur, gummigeitir og aðrar tungar maskinur. Henda tøknin er tó enn í menning, og úrvalið er í stóran mun ávirkað av støðd og nýtsluøki. Stutt sagt, er atgongdin til summar battarídrivnar maskinur størri enn til aðrar.

Samstundis vísir gransking sum heild, at battarídrivnar maskinur kunnu minka munandi um vakstrarhúsútlát, samanborið við dieselmaskinur. Hetta er tó serliga galdandi, tá tær verða riknar við elorku við lágum $CO_2$-útláti. Tí valdast umhvørvisligir fyrimunir í stóran mun um $CO_2$-útlátið frá elveitingarkervinum – men eisini um nýtslustig, haldføri hjá maskinuni, og hvussu ofta battarí skulu skiftast. Battaríframleiðsla og tilgongdin, tá battarí skulu avskipast aftur, hava nevniliga ávirkan á tilfeingisnýtslu og greiningina av lívsringrásini.

Vert er eisini at nevna, at aðrar orkuloysnir – so sum biogass ella hydrogen – framvegis eru minni áhugaverdar handilsliga, tá talan er um drívmegi til tungar maskinur, og tí verður hesin møguleikin ikki viðgjørdur nærri her.

Í løtuni er okkara elveitingarkervi í lítlan mun gjørt til at snarløða stór battarí. Eitt umfatandi skifti til elriknar maskinur hevði kravt, at elkervið varð munandi styrkt – herundir uppstigan av elneti á staðnum og løðistøðum.

Sum nevnt, valdast umhvørvisligir fyrimunir av elriknum amboðum í stóran mun um $CO_2$-útlátið frá elveitingini. Tey seinastu 10 árini hevur orkubýtið í Føroyum verið at kalla óbroytt. Framleiðslan hjá SEV úr VLSFO (Very Low Sulfur Fuel Oil), stendur fyri í miðal 50% av elframleiðsluni tilsamans. Øktur eltørvur – eitt nú frá elriknum amboðum – verður tí partvíst nøktaður við fossilum brennievni, uttan so at elframleiðslan burtur úr varandi orkukeldum økist í minsta lagi líka skjótt, sum tørvurin á elorku økist.

Hetta er ein avgerandi avbjóðing á kervisstigi, ið skal loysast fyri at tryggja, at umlegging av maskinparkini til elrikin amboð førir til munandi minni útlát.

Útlátsfrí byggipláss eru eisini treytað av, at varandi orka verður brúkt til fyribils installatiónir – so sum manningarskúrar. Hetta krevur:

- atgongd til tøkni, eitt nú hitapumpur, sólpanel ella aðrar hitaloysnir við lágum útláti, og
- atgongd til varandi orkukeldur ella pláss, tí hitapumpur skulu hava elorku, meðan sólpanel skulu hava pláss – nóg stórt tak ella nóg stórt opið øki.

**HITALOYSNIR – VERANDI STØÐA**

Fleiri burðardyggar hitaloysnir til manningarskúrar eru tøkar á marknaðinum. Íløgur í hesar loysnir kunnu geva eitt positivt NPV, alt eftir hvussu leingi verkætlanin varir, og hvussu nógv orka verður nýtt.

**ELFRAMLEIÐSLAN 2014–2025**



Vit høvdu eina royndarverkætlan á einum av okkara byggiplássum, har verkætlanarleiðarin á einari stórari verkætlan metti um íløguna at seta hitapumpur upp í skúrunum á plássinum, tá verkætlanin byrjaði. Greiningin legði upp fyri samlaða íløgukostnaðinum, longdini á verkætlanini og møguligu minkingini í elnýtslu í kWh, umroknað til spardan pening.

Úrslitini vóru greið. Íløgan gav eitt positivt NPV, og hon minkaði munandi um samlaðu elnýtsluna, og harvið minkaði $CO_2$-útlátið eisini.

$CO_2$-sparingin var ein positivur „eksternalitetur", ið stóðst av einari avgerð, sum var tikin av fíggjarligum ávum, men sum tó er vorðið eitt greitt fordømi fyri framtíðar mannagongdir hjá fyritøkuni og fyri okkara sannføring um, at burðardyggar loysnir eisini kunnu vera kappingarførar í prísi.

**ORKUBÝTIÐ**

Um elframleiðslan burtur úr varandi orkukeldum ikki veksur munandi – bæði fyri at minka verandi elframleiðslu úr olju og fyri at nøkta vaksandi eltørvin – so fara íløgur í eldrivin amboð ikki at bera fullan virknað við sær, tá talan er um at minka $CO_2$-útlátið.

Tað er við øðrum orðum greitt, at ein gongd ímóti elriknum maskinum ikki er nóg mikið fyri at halda eina burðardygga kós, tí slík átøk mugu stuðlast við einari skjótari útbygging av grønari elframleiðslu.

**HVUSSU KOMA VIT VÍÐARI?**

Tað er alneyðugt, at tættari samstarv fæst við myndugleikarnar um at dagføra mannagongdir fyri útbjóðingar, so onnur fyrilit enn lægsti prísurin eisini verða tikin við í metingarnar. Almenn útboð mugu tryggja samsvar millum útboð og langtíðarmál, sum hava til endamáls at minka $CO_2$-útlátið í Føroyum. Politiska skipanin má stuðla neyðugum broytingum í elveitingarkervinum, sum eru átrokandi fyri at fremja orkuskiftið.

Tá tað er sagt, skulu vit áhaldandi dagføra okkara vitan um nýggja tøkni, sum tryggjar dygdargóðar avgerðir, so hvørt sum loysnirnar mennast. Útboð kunnu fevna um meiri burðardyggar møguleikar, har tað er gjørligt, tí tøknilig val eiga at vera grundað á fakta og lagað eftir veruligum umstøðum.

Í ávísum førum, har elframleiðslan í stóran mun er grundað á fossilt brennievni, har nýtslustigið er lágt, ella atgongdin til elnetið er skerd, kann umhvørvisávirkanin frá verandi dieselmaskinum fyribils góðtakast, sammett við elrikna útgerð. Viðurskifti sum t.d. styttri flutningur, munagóður rakstur ella „optimeraður logistikkur" kunnu viðhvørt geva størri fyrimunir enn eitt ótíðarhóskandi tøkniskifti. Hetta má tó vera í samanhangi við skynsama tilfeingisnýtslu, sum eitt nú at amboð verða hildin við líka rættstundis á rættan hátt, og at arbeitt verður við at minka tómgongdina í akførum og maskinum.

**Anna Kalsø**
*Varastjóri og*
*menningarleiðari*



# SOSIALU TØLINI

*Grundár: 2024*

## Starvsfólkahópur — Talva 18

| Starvsfólkahópur | Eind | Mál, ár fyri ár | 2025 | 2024 | 2023 | 2022 | VSME-nr. | Frágreiðing |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Fulltíðarstarvsfólk | Ársverk | | 100 | **110** | 131 | 144 | B8-39 | ***Ársverk:*** *Vit rokna ársverk á hendan hátt:* Allir arbeiddir tímar verða tiknir úr okkara stempulskipan, íroknað sjúkradagar, skúli, barsil v.m. Talið verður býtt við 1772.<br><br>***1772 verður roknað soleiðis:*** *2080:* arbeiðstímar í árinum, minus 240, sum svarar til 6 vikur feriu, og minus 68, sum er miðaltal fyri fastar frídagar.<br><br>Innleigað fólk, sum hava nýtt okkara stempulskipan, telja ikki við í ársverk. Tímarnir, tey hava arbeitt, verða tiknir burturúr, áðrenn talið verður býtt í ársverk. Treytin fyri at telja við í ársverk er, at starvsfólkið fær løn frá okkum. Vit upplýsa innleigað fólk á eyka linju. |
| Løntakarar (headcount) | Stk. | | 143 | **182** | 217 | 212 | B8-39 | Øll á lønarlistanum í árinum við setanarskrivi. |
| Fyribils starvsfólk | % av ársverk | | 1,8% | **2,4%** | 3,8% | 3,0% | B8-39a | Starvsfólk, ið ikki eru fastsett.<br>Ársverk fyribils starvsfólk/ársverk í alt x 100%. |
| Fastsett starvsfólk | % av ársverk | | 98,2% | **97,6%** | 96,2% | 97,0% | B8-39a | Ársverk fastsett starvsfólk/ársverk í alt x 100%. |
| Lærlingar | Ársverk | | 8 | **10** | 11 | 14 | Sjálvboðin upplýsing | Ársverk, lærlingar. |
| Lærlingar, sum % av ársverk | % av ársverk | **Min. 10%** | 7,6% | **9,3%** | 8,3% | 9,6% | Sjálvboðin upplýsing | Ársverk lærlingar/ársverk í alt x 100. |
| Starvsfólk í serligum starvi | Stk. | | 2 | **2** | 2 | 1 | Sjálvboðin upplýsing | Fólk í vardum starvi, ella sett eftir serligari avtalu við Almannaverkið ella serskúla. |
| Sjávstøðugir ráðgevar | Stk. | | 7 | **6** | 0 | 0 | C5-60 | Ráðgevar, vit hava nýtt í árinum. |
| Starvsfólk leigað gjøgnum vikarstovu | Ársverk | | 1 | **1** | 1 | 3 | C5-60 | Ársverk starvsfólk leigað gjøgnum vikarstovu/ársverk í alt x 100%. |
| Innleigað fólk | Ársverk | | 9 | **4** | 7 | 14 | Sjálvboðin upplýsing | Stemplaðir tímar, íroknað sjúkratímar/1772. |

| Setanaravtalur | | | | | | | Talva 19 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Land, har setanarskrivið er gjørt** | **Eind** | **2025** | **2024** | **2023** | **2022** | **VSME-nr.** | **Frágreiðing** |
| Føroyar | Ársverk | 100 | **110** | 131 | 144 | B8-39c | Hjá J&K eru øll setanarskriv gjørd í Føroyum. Vit hava í løtuni ikki nakað virksemi uttanlands. |

# STARVSFÓLKAHÓPUR

Í frágreiðingini hava vit nýtt tvey lyklatøl, tá vit gera starvsfólk upp; fulltíðarstarvsfólk = ársverk, og tal av starvsfólkum = headcount.

Ársverk (fulltíðarstarvsfólk): Vit rokna ársverk á hendan hátt: allir arbeiddir tímar verða tiknir úr okkara stempulskipan, íroknað sjúkradagar, skúli, barsil v.m. Talið verður býtt við 1772.

1772 verður roknað soleiðis: 2080: arbeiðstímar í árinum, minus 240, sum svarar til 6 vikur feriu, og minus 68, sum er miðaltal fyri fastir frídagar.

Innleigað fólk, sum hava nýtt okkara stempulskipan, telja ikki við í ársverk. Tímarnir, tey hava arbeitt, verða tiknir burturúr, áðrenn talið verður býtt í ársverk. Treytin fyri at telja við í ársverk er, at starvsfólkið fær løn frá okkum. Vit upplýsa innleigað fólk á eyka linju.

G.G. at ársverk sambært okkara roknskapi eru íroknað innleigað fólk.

Løntakarar (headcount): øll á lønarlistanum í árinum við setanarskrivi.

## Kynsbýti — Talva 20

| Fjølbroytni | Eind | Mál, ár fyri ár | 2025 | 2024 | 2023 | 2022 | VSME-nr. | Frágreiðing |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Menn | Ársverk | | 92 | **102** | 124 | 139 | B8-39b | Tímar hjá monnum/1772. |
| Kvinnur | Ársverk | | 8 | **8** | 7 | 5 | B8-39b | Tímar hjá kvinnum/1772. |
| Annað/Ikki skrásett kyn | Ársverk | | 0 | **0** | 0 | 0 | B8-39b | |
| Kynsbýti (K) | Lutfall | | 1:11 | **1:13** | 1:18 | 1:30 | B8-39b | Vit brúka ársverk. Lutfall millum kvinnur og menn. |
| Kynsbýti á leiðslustigi (K) | Lutfall | **Min. 1/3 av leiðsluni** | 1:3 | **1:3** | 1:3 | 1:3 | C5-60 | Lutfall millum kvinnur og menn í ovastu leiðslu, t.v.s. stjóra, varðastjóra og fíggjarleiðara. |
| Tjóðskapur, annar enn føroyskur | % av ársverk | | 21,3% | **20,6%** | 19,7% | 27,0% | Sjálvboðin upplýsing | Ársverk útlendingar/ársverk x 100. |
| Miðalaldur á starvsfólkum | Ár | | 40 | **38** | 37 | 40 | Sjálvboðin upplýsing | Headcount. Miðalaldur fyri allar løntakarar. |
| Undir 30 ár | Stk. | | 43 | **63** | 80 | 57 | Sjálvboðin upplýsing – aldursbólking samb. EFRAG Implementation Guidance 3 | Headcount |
| 30–49 ár | Stk. | | 56 | **70** | 85 | 94 | Sjálvboðin upplýsing – aldursbólking samb. EFRAG Implementation Guidance 3 | Headcount |
| yvir 50 ár | Stk. | | 44 | **49** | 52 | 61 | Sjálvboðin upplýsing – aldursbólking samb. EFRAG Implementation Guidance 3 | Headcount |
| Miðal starvsaldur | Ár | | 5,0 | **4,6** | 4,1 | 4,3 | Sjálvboðin upplýsing | Miðal starvsaldur fyri fast sett (íroknað tímalønt í føstum starvi). Fyribils sett (avloysarar) verða ikki tald við. |
| Miðal starvsaldur, undir 30 ár | Ár | | 1,3 | **1,3** | 1,1 | 2,3 | Sjálvboðin upplýsing – aldursbólking samb. EFRAG Implementation Guidance 3 | Headcount |
| Miðal starvsaldur, millum 30 og 49 ár | Ár | | 3,6 | **3,3** | 2,9 | 3,0 | Sjálvboðin upplýsing – aldursbólking samb. EFRAG Implementation Guidance 3 | Headcount |
| Miðal starvsaldur, yvir 50 ár | Ár | | 8,9 | **7,3** | 6,7 | 8,0 | Sjálvboðin upplýsing – aldursbólking samb. EFRAG Implementation Guidance 3 | Headcount |

## Trivnaður, trygd og heilsa hjá starvsfólkum — Talva 21

| Trivnaður, trygd og heilsa | Eind | Mál, ár fyri ár | 2025 | 2024 | 2023 | 2022 | VSME-nr. | Frágreiðing |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Broytingar í starvsfólkahópi | % | | 25,8% | **33,3%** | | | B8-40 | Headcount farin úr starvi/ Headcount í alt x 100. |
| Broytingar í starvsfólkahópi, menn | % | | 27,0% | **35,6%** | 24,8% | 30,6% | Sjálvboðin upplýsing | Headcount menn farnir úr starvi/ Headcount menn x 100. |
| Broytingar í starvsfólkahópi, kvinnur | % | | 15,4% | **18,2%** | 35,7% | 18,2% | Sjálvboðin upplýsing | Headcount kvinnur farnir úr starvi/ Headcount kvinnur x 100. |
| Sjúkrafrávera orsakað av arbeiðsóhappi ella vinnusjúku | % | **0%** | 0,5% | **0,1%** | | | Sjálvboðin upplýsing | Sjúkrafrávera beinleiðis orsakað av arbeiðsskaða ella vinnusjúku Í 2024 stendst fráveran av arbeiðsóhappi í 2023. |
| Skrásett arbeiðsóhapp | Stk. | **0** | 11 | **1** | 5 | 6 | B9-41a | Arbeiðsóhapp, ið føra til likamligan ella sálarligan skaða. |
| Arbeiðsóhapp við fráveru (LTI) | Stk. | **0** | 8 | **0** | 5 | 6 | Sjálvboðin upplýsing | Arbeiðsóhapp, ið føra til fráveru. |
| Arbeiðsóhapp uttan fráveru | Stk. | **0** | 3 | **1** | 0 | 0 | Sjálvboðin upplýsing | Arbeiðsóhapp, ið ikki føra til fráveru. |
| Títtleiki av arbeiðsóhappum | Skaðar pr. 200.000 arbeiðstímar | **0** | 12 | **1** | 4 | 5 | B9-41a | Tal av arbeiðsvanlukkum pr. 200.000 arbeiðstímar. |
| Arbeiddir tímar pr. arbeiðsóhápp | Tímar/stk. | | 16.139 | **194.134** | 46.553 | 41.254 | Sjálvboðin upplýsing | Arbeiddir tímar/stk. arbeiðsóhapp. |
| Deyðsfall orsakai av arbeiðssóhappi | Stk. | **0** | 0 | **0** | 0 | 0 | B9-41b | |
| Deyðsfall orsakai av arbeiðstengdum heilsutrupulleika | Stk. | **0** | 0 | **0** | 0 | 0 | B9-41b | |

## Rættindi hjá starvsfólkum — Talva 22

| Rættindi hjá starvsfólkum | Eind | 2025 | 2024 | 2023 | 2022 | VSME-nr. | Frágreiðing |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Øll starvsfólk fáa eina løn, sum í minsta lagi er á støði við minstulønina | Ja/nei | Ja | **Ja** | Ja | Ja | B10-42a | Øll hjá J&K fáa løn svarandi til sáttmála ella hægri. |
| Starvsfólk, ið eru fevnd av kollektivum sáttmála | % | 100% | **100%** | 100% | 100% | B10-42c | Tímalønt eru fevnd av kollektivum sáttmála. Fastlønt eru sett eftir individuellum treytum. Fleiri starvsøki, serliga hjá teimum fastløntu, eru ikki er fevnd av avtalum á privata arbeiðs-marknaðinum. Sum dømi kann nevnast, at Akademikarafelag Føroya onga avtalu hevur við tað privata. Hóast øll starvsfólk ikki eru fevnd av kollektivum sáttmála, eru øll tryggjað treytir samsvarandi við ella betur enn í sáttmálunum. Hetta speglast aftur í, at felagið hevur valt at javnstilla frídagar, hálvar frídagar og rættin til feriu. Sostatt halda øll frí í senn, og hava øll rætt til 6 vikur feriu. |
| Lønarmunur millum kyn (M/K) | % | 5,5% | **2,5%** | 3,9% | 12,6% | B10-42b | Miðalbruttotímaløn fyri menn – miðalbruttotímaløn fyri kvinnur/ miðalbruttotímaløn fyri menn x 100. |
| Útbúgvingartímar pr. ársverk menn | Tímar | 54 | **54** | 35 | 46 | B10-42d | Útbúgvingartímar hjá øllum fastløntum, tímaløntum og lærlingum, sum eru kallkyn/ársverk menn. |
| Útbúgvingartímar pr. ársverk kvinnur | Tímar | 32 | **57** | 4 | 2 | B10-42d | Útbúgvingartímar hjá øllum fastløntum, tímaløntum og lærlingum, sum eru kvennkyn/ársverk kvinnur. |
| Útbúgvingartímar pr. onnur starvsfólk | Tímar | 0 | **0** | 0 | 0 | B10-42d | |
| Útbúgvingartímar í alt fyri mannlig starvsfólk | Tímar | 4.944 | **4.326** | 4.326 | 6.352 | Sjálvboðin upplýsing | Útbúgvingartímar í alt fyri menn. Áðrenn 2024 er ein óvissa í tímunum, tí vit ikki hava haft fastar mannagongdir, nær mann stemplar skúla/skeið. |
| Útbúgvingartímar í alt fyri kvinnulig starvsfólk | Tímar | 273 | **427** | 30 | 8 | Sjálvboðin upplýsing | Útbúgvingartímar í alt fyri kvinnur. Áðrenn 2024 er ein óvissa í tímunum, tí vit ikki hava haft fastar mannagongdir, nær mann stemplar skúla/skeið. |
| Harvav útbúgvingartímar hjá lærlingum | Tímar | 4.405 | **5.211** | 4.186 | 6.146 | Sjálvboðin upplýsing | Útbúgvingartímar hjá lærlingum (bæði kynini). |

## Atferðarreglar — Talva 23

| Øki | Støðutakan | Svar | Tilvísing | VSME-nr. |
|---|---|---|---|---|
| Atferðarreglar fyri starvsfólk | J&K Petersen hevur reglur fyri atferð galdandi fyri starvsfólk. | Ja | Er lýst í starvsfólkahandbókini, undir „Etikkur“. | C6-61 |
| Fyribyrging av óhappum | J&K Petersen hevur eina innanhýsis skipan fyri fyribyrging av óhappum. | Ja | Fullfíggjað HTU- og góskuskipan umframt TAG (Trygg-Arbeiðs-Greining) fyri øll serstøk arbeiðir. | C7-62b |
| Skipan fyri klagur | J&K Petersen hevur eina innanhýsis skipan til klagur frá egnum starvsfólkum. | Ja | Eygleiðingarkort, sum eisini verða brúkt sum skipan fyri klagur. | C6-61 |
| Skrásettar hendingar – barnaarbeiði | Hevur nøkur hending verið við barnaarbeiði? | Nei | Vit hava onga skrásetta hending. | C6-61 og C7-62 |
| Skrásettar hendingar – tvungið arbeiði | Hevur nøkur hending verið við tvangsarbeiði? | Nei | Vit hava onga skrásetta hending. | C6-61 og C7-62 |
| Skrásettar hendingar – menniskjahandil | Hevur nøkur hending verið við mannahandli? | Nei | Vit hava onga skrásetta hending. | C6-61 og C7-62 |
| Skrásettar hendingar – mismunur | Hevur nøkur hending verið við mismuni móti egnum starvsfólkum? | Nei | Vit hava onga skrásetta hending. | C6-61 og C7-62 |

# UMSKIPAN OG BROYTINGAR Á STARVSFÓLKAØKINUM

**J&K Petersen varð endurskipað eftir fíggjarliga tungu árini 2021–2022. Tað hevði við sær fyrisitingarligar broytingar, sum eisini ávirkaðu starvsfólkaøkið**

Eins og umrøtt í greinum frammanfyri, var neyðugt at endurskipa J&K Petersen eftir fíggjarliga tungu árini 2021–2022. Henda umskipan broytti fleiri fyrisitingarlig viðurskifti, sum eisini elvdu til broytingar á starvsfólkaøkinum. Hesar broytingar síggjast aftur í sosialu tølunum niðanfyri. Síðani 2022 hava vit – eins og nevnt frammanfyri – savnað sosial tøl í einum dátugrunni fyri at fáa til vega eitt dyggari hagtalsgrundarlag. Vit eru loksins komin á mál við hesum arbeiði, og nú ber til at vísa á fleiri av teimum sosialu tølunum, sum lýsa støðuna árini 2022–2025.

**BROYTINGAR Í STARVSFÓLKAHÓPINUM**
Millum 2022 og 2025 minkaði starvsfólkatalið í felagnum umleið 31% – úr 144 niður í 100 ársverk. Henda minkingin er liður í einari strategiskari tillaging av rakstrinum, ið hevur til endamáls at tryggja haldføri og effektivitet.

Lutfallið av starvsfólkum í føstum starvi hevur verið vaksandi – 97% í 2022 upp í 98% í 2025. Talið av fyribils settum starvsfólkum er minkað samsvarandi í sama tíðarskeiði – 4 ársverk í 2022 niður í 2 ársverk í 2025. Hetta vísir eina tilvitaða ætlan um meira støðufesti í starvsfólkahópinum.

Mál okkara er, at í minsta lagi 10% av starvsfólkunum skulu vera lærlingar. Málið er sett, tí J&K Petersen vil menna førleikar og vera við til at tryggja komandi ættarlið av faklærdum í føroysku byggivinnuni. Vit mugu ásanna, at seinastu fýra árini er talið av lærlingum minkað. Í 2024 vóru 9% av ársverkunum lærlingar, og í 2025 var sama lyklatal lækkað niður í 8%.

Lærupláss eru eyðsæð eitt menningarøki hjá okkum, og í 2026 verður størri orka løgd í at fáa fleiri lærlingar at koma í læru hjá J&K Petersen.






## 2022
**ÁRSVERK/LØNTAKARAR**




**144/212**

## 2023
**ÁRSVERK/LØNTAKARAR**




**131/217**

## 2024
**ÁRSVERK/LØNTAKARAR**




**110/182**

## 2025
**ÁRSVERK/LØNTAKARAR**




**100/143**

## KYNSBÝTI 2024




## KYNSBÝTI 2025




## % KVINNUR




**STAÐSETING OG LANDAFRØÐI**

J&K Petersen virkar einans í Føroyum. Vit eru errin av at vera ein føroyskur arbeiðsgevari burturav, sum stuðlar undir og gevur sítt íkast til føroyska búskapin og arbeiðsmarknaðin. Tá vit einans hugsavna okkum um at virka í Føroyum, gevur tað okkum møguleika í eini broytingartíð at varðveita tætt sambond við nærumhvørvið.

J&K Petersen hevur áður verið virkið í Noreg, Grønlandi og Íslandi, og hetta eru marknaðir, sum framvegis hava okkara áhuga, um røttu fortreytirnar eru til staðar.

**FJØLBROYTNI OG FEVNANDI ARBEIÐSMENTAN**

Byggivinnan er ein mansrikin geiri, og hon er eyðkend av kropsliga hørðum arbeiði og ávirkað av søguligum mynstrum. Vit viðurkenna tó týdningin av kynsligum fjølbroytni, tí alsamt fleiri kvinnur í byggivinnuni kunnu hava við sær fleiri og fjølbroytt sjónarmið, betri samstarv og eina meira fevnandi arbeiðsmentan. Júst hesi sjónarmiðini koma vit eitt sindur nærri inn á seinni í hesi frágreiðingini undir Leiðslu, í samrøðu við okkara eigara, nevndarlim og fyrrverandi stjóra, Ragnhild Arnóru Petersen, og Annu Kalsø, varastjóra.

Vit hava ikki sett formlig mál fyri fjølbroytni, men vit arbeiða við at skapa eitt umhvørvi og karmar, sum gera tað hugaligt hjá fleiri kvinnum at koma í starv hjá okkum. Lutfallið av kvinnum vaks úr 3% í 2022 upp í 8% í 2025. Orsøkin er, at talið av kvinnum øktist úr 5 upp í 8, samstundis sum starvsfólkahópurin minkaði.

Á leiðslustigi eru kvinnur umboðaðar við einum triðingi, sum hevur verið eitt støðugt lutfall seinastu árini.

Lutfallið av útlendskum starvsfólkum hevur verið minkandi – 27% í 2022 niður í 21% í 2025. Hetta talið fevnir um norðurlendingar, t.e. íroknað danir, umframt ES-borgarar og ikki ES-borgarar. Tað kann tykjast sum, at okkara umskipanir lutfalsliga hava rakt útlendsk starvsfólk í størri mun enn onnur. Hetta er tó einans partvíst satt. Talið av útlendingum, sum luttaka í virkseminum hjá J&K Petersen, er støðugt hækkað árini 2023–2025, tí vit leiga útlendska arbeiðsmegi ígjøgnum ein umboðsmann, og sostatt eru hesi fólk ikki at síggja á okkara lønarlista. Fyri at skapa gjøgnumskygd hava vit valt at hava hetta lyklatalið við sum eitt eyka lyklatal.

Miðalaldurin á starvsfólkunum er 40 ár. Aldursbýtið vísir bert smávegis sveiggj, tó við einum undantaki í 2023, tá felagið hevði 80 starvsfólk undir 30 ár í starvi – samanborið við 57 undir 30 ár í 2022 og 43 undir 30 ár í 2025. Ein stórur partur av hesum ungu starvsfólkunum, mest tey undir 25 ár, vórðu sett í starv í sambandi við Havnaráverkætlanina, og hetta vísir, hvussu okkara vinna ávirkast av teimum verkætlanum, sum verða bodnar út.

**MIÐAL STARVSALDUR PR. ALDURSBÓLK**



**TRIVNAÐUR, TRYGD OG HEILSA**

Tað kann vera ein avbjóðing at varðveita starvsfólk í einari árstíðar- og verkætlanargrundaðari vinnu. Harafturat leggja vit stóran dent á at seta starvsfólk, sum hava tilknýti til økið, har ein verkætlan er staðsett. Á henda hátt virka vit fyri at stuðla arbeiðsmarknaðinum á staðnum og teimum kommunalu skattainntøkunum. Tá ið verkætlanir enda, steðgar arbeiðið natúrliga fyri tey, sum ikki velja at flyta við til aðrar verkætlanir .Vit royna tó altíð at bjóða teimum, sum ynskja tað, framhaldandi arbeiði. Til dømis fluttu fleiri maskinførarar úr Suðuroy til Sørvágs at halda fram at arbeiða fyri J&K Petersen, tá ið Fámjinstunnilin var liðugur.

Starvsfólk eru vanliga longur í starvi, tá ið tey arbeiða við fyrisitingarligum uppgávum – og hetta sæst serliga aftur hjá kvinnum, har útskiftingin er minni. Eisini økist haldførið við aldrinum. Hetta er eitt vanligt rák, tí yngri fólk velja í størri mun at fara undir útbúgvingar, og tey fara tí ofta partvíst ella heilt av arbeiðsmarknaðinum í eina tíð. Við árunum tykist tað sum, at tey flestu vilja finna støðufesti, og tí starvast fólk longur og longur hjá einum arbeiðsgevara, eldri tey gerast. Hetta sæst aftur í, at starvsaldurin er nógv hægri millum starvsfólk okkara, sum eru 50 ár ella eldri, enn hjá teimum, sum eru yngri enn 30 ár.

Arbeiðstongd sjúkrafrávera hevur verið lág – 0,1% í 2024 og 0,5% í 2025. Málið er, at onga arbeiðstongda sjúkrafráveru hava.

Tá talan er um arbeiðstrygd, var 2024 eitt serstakliga gott ár við metfáum óhappum. Tað vóru eingi *LTI* (Lost Time Injury) ella arbeiðstíðartap skrásett – og einans eitt minni óhapp uttan arbeiðstíðartap. Hetta er framgongd samanborið við 5 *LTI* í 2023 og 6 *LTI* í 2022. Leiðslan staðfesti tó, at hesi tølini helst bert vísa tey størru óhappini, og tískil er møguligt, at smærri tilburðir ikki eru skrásettir. Nýggj tiltøk eru tí sett í verk fyri at fáa øll starvsfólk at boða frá øllum óhappum, tilburðum og minni skaðum – hetta er partur av HTU-bonusskipanini, sum verður lýst í eini grein á s. 46.

Vit síggja tíverri eina øking í skrásettum óhappum við *LTI* frá 2024 til 2025. Hetta taka vit í størsta álvara, og tí eru mannagongdir dagførdar fyri at fyribyrgja slíkum hendingum aftur. Eitt nú hevur trygdarnevndin dagført mannagongdir í sambandi við Lessons Learned, og krøvini til *Tryggar-Arbeiðs-Greiningingar* í 2026 eru vorðin strangari.

Tølini fyri arbeiðsóhapp uttan *LTI* skulu tó ikki neyðturviliga lesast sum, at

**ALDURSBÝTI 2024**




*Miðalaldur: 38 ár*

**ALDURSBÝTI 2025**




*Miðalaldur: 40 ár*



trygdin er versnað, men heldur metast sum prógv fyri einari virknari fráboðanarskipan. Vit vita við vissu, at vit áður ikki nágreiniliga hava skrásett øll arbeiðsóhapp uttan *LTI*, t.e. reporting bias, har smærri skaðar ikki altíð hava verið skrásettir.

## RÆTTINDI HJÁ STARVSFÓLKUM

Eitt stórt stig móti rættvísum arbeiðsumstøðum var tikið í 2023, tá ið J&K Petersen setti í verk eina harmonisering av arbeiðstreytum fyri at javnseta ymisku starvsbólkarnar.

Hóast fleiri mánaðarlønt starvsfólk ikki eru fevnd av fakfelagssáttmálum – t.d. teimum hjá Akademikarafelag Føroya – tryggja vit, at øll starvsfólk hava treytir, ið eru minst á jøvnum føti við vinnustandardin. Hetta fevnir um javnsettar feriudagar, hálvar frídagar og frítíðarrættindi. Vit hava nýtt meginregluna um hægsta felagsnevnara, soleiðis at øll mánaðarlønt starvsfólk hava somu rættindi – eitt nú seks vikur frí við løn um árið.

## JAVNSETING MILLUM KYNINI OG LØN

Lønarmunurin millum kynini er minkaður munandi – úr 12,6% í 2022 niður í 5,5% í 2025. Í 2024 var talið 2,5%, sum møguliga er tað meira rættvísandi talið. Í 2025 var nevniliga nógv náttararbeiði í gongd hjá J&K Petersen, og tað vóru burturav menn, sum arbeiddu um náttina.

Vit meta okkum hava javnvág í lønartreytunum millum kynini. Hóast tað er sjáldsamt, at menn og kvinnur starvast innan sama fakøki í fyritøkuni, er ikki lønarmunur millum kvinnur og menn, har kynini starvast á sama fakøki.

## ÚTBÚGVING OG MENNING

Støðug menning er avgerandi í okkara vinnu – serliga innan trygd, fyrstuhjálp, talgilding, starvsfólkaviðurskifti og umhvørvi.

Í 2022 og 2023 høvdu mannlig starvsfólk í miðal ávikavist 46 og 35 útbúgvingartímar um árið. Til samanberingar høvdu kvinnur nógv færri tímar – 2 tímar fyri hvørja kvinnu í 2022 og 4 tímar fyri hvørja kvinnu í 2023. Ljós varð varpað á hetta økið í 2024, og úrslitið var, at talið av útbúgvingartímum tilsamans hjá kvinnum vaks munandi – upp í 48 tímar fyri hvørt kvinnuligt starvsfólk. Í 2025 var talið av útbúgvingartímum hjá monnum 54 tímar og 32 tímar hjá kvinnum.

Tað er vert at nevna, at tíðin, ið lærlingar nýta í skúla, er roknað við í hesum tímatalinum. Tískil minkaði munurin millum menn og kvinnur – bæði við at økja útbúgvingartímarnar hjá kvinnum uttan at minka teir hjá monnum – og við at seta ein kvinnuligan lærling.

Mál okkara er at varðveita eitt høgt tímatal fyri venjing og útbúgving fyri hvørt starvsfólk fyri at tryggja, at starvsfólk okkara eru fakliga væl ílatin, trygg og til reiðar til framtíðina.

### BROYTINGAR Í STARVSFÓLKAHÓPI %




### LØNARMUNUR MILLUM KYN

**Lønarmunurin millum kynini er minkaður við 56% frá 2022 til 2025.**




### ÚTBÚGVINGARTÍMAR PR. ÁRSVERK






J&K PETERSEN



# STARVSFÓLKAHEILSA OG ARBEIÐSHEILSA Í SKIPAÐUM KØRMUM

## Lunnar eru lagdir undir eitt skipað og fyribyrgjandi arbeiði innan økini starvsfólkaheilsa og arbeiðsheilsa

Í 2023 setti leiðslan í J&K Petersen ein arbeiðsbólk við umboðum úr HR og HTU at greina heilsustøðuna í fyritøkuni. Endamálið var at leggja lunnar undir eitt meira skipað og fyribyrgjandi arbeiði innan starvsfólkaheilsu og arbeiðsheilsu.

Í okkara fyritøku gera vit greiðan skilnað millum hugtøkini arbeiðsheilsa og starvsfólkaheilsa.

Arbeiðsheilsa er bundin at lóg, og hon snýr seg um sambandið millum sjálvt arbeiðið og heilsuna. Arbeiðsheilsa fevnir um trygd, váðastýring og fyribyrging av arbeiðssjúkum og vanlukkum. Her arbeiða vit miðvíst fyri at tryggja eitt fullgott arbeiðsumhvørvi – t.e. við betri verndarútgerð enn kravt, talgildari trygdarkunning, HAVS*-kanningum og við støðugt at menna okkara trygdartilgongdir.

*LTI (Lost Time Injury)* er eitt týdningarmikið mát fyri arbeiðsheilsu. *LTI* vísir á arbeiðsóhapp, sum elva til fráveru. Hetta er ein altjóða nýttur mátistokkur, ið gevur okkum møguleika at arbeiða við trygd bæði fakliga og gjøgnumskygt. Vit máta bæði tal og slag av *LTI*, og vit brúka hesi hagtøl til at greina orsøkir, menna tiltøk og leggja til rættis, hvat vit skulu leggja dent á at styrkja.

Starvsfólkaheilsa er hinvegin ikki lógarbundin, og hon fevnir víðari enn arbeiðið sjálvt – her er talan um at røkja likamliga, sálarliga og sosiala heilsu hjá starvsfólkunum. Vit skipa fyri átøkum, ið stuðla einum heilsugóðum lívsstíli, fyribyrgja strongd og menna sálarligan trivnað. Vit bjóða m.a. prísavtalur við venjingarmiðstøðir, fruktkassar, opið samskifti um ymiskar avbjóðingar og árligar heilsukanningar. Á høvuðsskrivstovuni, har vit hava eina kantinuskipan, bjóða vit heilsugóðan kost.

Mátistokkurin á hesum øki er sjúkrafrávera, sum ikki kann teingjast at viðurskiftum á arbeiðsplássinum. Sjúkrafrávera gevur okkum eina heildarmynd av, hvussu starvsfólkaheilsa- og trivnaður eru, og hvørjum økjum vit kunnu arbeiða fyribyrgjandi við. Vit brúka hagtølini bæði til at eyðmerkja gongdina og gera ábøtur, har tørvur er á tí.

Vit samantvinna *LTI* innan arbeiðsheilsu og sjúkrafráveru innan starvsfólkaheilsu, og á henda hátt arbeiða vit við einari fyribyrgjandi heildartilgongd, sum styrkir bæði starvsfólkini og fyritøkuna sum heild. Í frágreiðingini hava vit valt einans at upplýsa sjúkrafráveru, sum er tongd at arbeiðsskaðum og vinnusjúkum.

***HAVS-syndrom = Hond-Arm Vibratión Syndrom** er ein arbeiðsskaði, sum kemur av áhaldandi ristingum frá amboðum. Hjá okkum er talan um førarar, sum í longri tíð hava stýrt maskinum og verið fyri nógvum ristingum.*

***Vanligastu eyðkennini:***

- *Dovnir ella kensluleysir fingrar/hendur*
- *Kuldakensla og hvítir fingrar (serliga í kulda og vætu)*
- *Sovandi hendur/fingrar*
- *Minkandi styrki og fimi í fingrum*

*Um batar ikki verða gjørdir tíðliga, kunnu skaðarnir gerast varandi.*




**Í tíðarskeiðnum 2022–2026 verður arbeitt við støðugt at menna økini arbeiðsheilsa og starvsfólkaheilsa m.a. við hesum átøkum:**

- Gestarøðari á 60+ degnum greiðir frá, hvussu góð sálarheilsa kann varðveitast í pensjónsaldrinum (ætlað 2026)
- Førleikamenning hjá teimum, sum arbeiða við starvsfólkaheilsu (síðani 2025)
- Trivnaðarumboð og strangt eftirlit við búeindunum (síðani 2025)
- Útbúgvingartilboð til leiðarar við neurodiversum starvsfólkum (síðani 2024)
- Bjóða øllum arbeiðsplássum fruktkassar (síðani 2024)
- Kantinuskipanin á Hjalla bjóðar heilsugóðan mat (síðani 2024)
- Øll starvsfólk fáa ókeypis árliga heilsukanning hjá Medcare (síðani 2024)
- Har tørvur er, verður bjóðað niðursett arbeiðstíð (síðani 2024)
- Vit noyða fólk at halda frí fyri at fyribyrgja strongd (síðani 2024)
- Vit vísa á vegleiðingar til roykistopp (síðani 2023)
- Vit mæla til, at arbeitt verður ikki uttan fyri vanliga arbeiðstíð (síðani 2023)
- Vit hava prísavtalur við fleiri venjingarmiðstøðir (síðani 2023)

# EYGLEIÐINGARKORTIÐ EITT TÝÐANDI AMBOÐ

## Eygleiðingarkortið er ein týdningarmikil partur av fráboðanarskipanini hjá J&K Petersen, har tað bæði ber til at boða frá klagum og lata uppskot inn

J&K Petersen hevur eina fráboðanarskipan, har starvsfólk kunnu boða frá hendingum, nærvið-hendingum og koma við uppskotum til batar á arbeiðsplássinum. Boðað verður frá umvegis eitt *eygleiðingarkort*, sum vit hava valt at nevna tað. Tá vit vísa á, at vit hava eina formliga skipan til at taka ímóti klagum og uppskotum, so er tað *eygleiðingarkortini*, vit meina við.

Endamálið við skipanini er at styrkja okkara arbeiðsumhvørvi, tryggja heilsu og minka um vandar, áðrenn støðan gerst hættislig.

*Eygleiðingarkortini* kunnu latast inn talgilt gjøgnum HR-skipanina ella sum teldupostur. Vit hava eisini kort liggjandi á øllum okkara arbeiðsplássum, har tey kunnu fyllast út og latast í ein serligan postkassa, sum trygdarleiðarin tømir. Hetta tryggjar, at øll hava møguleika at luttaka – bæði tey, sum vilja leggja navn til, og tey, sum vilja vera dulnevnd.

Trygdarleiðarin gjøgnumgongur kortini, sum koma inn, og stundum fer trygdarnevndin eisini ígjøgnum kortini. Trygdarnevndin viðger hugskot til batar, og feilir ella frávik verða greinað. Har tað er neyðugt, verða bøtandi tiltøk sett í verk. Hetta er ein partur av okkara arbeiði at skapa eitt trygt og ábyrgdarfult arbeiðspláss.

Eygleiðingarskipanin verður eisini brúkt til at savna hugskot, sum kunnu betra um heilsu, trygd og umhvørvi. Hetta merkir, at skipanin ikki bert er til at loysa trupulleikar, men eisini til at menna okkara arbeiðspláss til framtíðar avbjóðingar.

Í 2024 staðfestu vit, at talið av *eygleiðingarkortum* var ov lágt – eisini sammett við starvsfólkatalið, sum hevði verið minkandi árini 2022–2023, tá J&K Petersen var umskipað. Vit kunnu staðfesta, at tað var ein avbjóðing at fáa fólk at brúka skipanina.

Í eini roynd at fáa størri undirtøku fyri fráboðanarskipanini, settu vit eina HTU-bonusskipan í verk, har tað er eitt krav, at ein ávís mongd av *eygleiðingarkortum* verður latin inn. Endamálið var at gera fráboðanirnar meira sjónligar og at geva starvsfólkum eina greiða áminning um týdningin av at boða frá.

Tiltøkini í 2025 hava borið við sær, at talið av *eygleiðingarkortum* er munandi økt. Hetta er eitt greitt tekin um, at vit eru á rættari leið. Vit síggja, at starvsfólk nú hava fingið eina greiðari fatan av týdninginum, skipanin hevur, og hetta má sigast at vera ein jalig gongd, sum vit vilja halda fast í.

*Eygleiðingarkort* eru ikki bert ein formlig skipan – tey eru ein trygdarmekanisma, sum hjálpir okkum at fyribyrgja óhappum og økja um trivnaðin. Vit vilja tí framhaldandi varpa ljós á skipanina, lætta um atgongdina og vissa øllum starvsfólkum, at tey trygt kunnu brúka fráboðanarskipanina.






## EYGLEIÐINGARKORT 2016–2025




## EYGLEIÐINGARKORT PR. LØNTAKARA 2022–2025



# LEIÐSLUTØLINI

*Grundár: 2024*

| Leiðsla | | | | Talva 25 |
|---|---|---|---|---|
| **Lyklatal** | **Eind** | **2025** | **2024** | **VSME-nr.** |
| Dómar innan korruptión og mutur | Stk. | 0 | **0** | B11-43 |
| Samlað upphædd fyri bøtur | Kr. | 0 | **0** | B11-43 |
| Kynsbýti í nevnd (% kvinnur) | % | 25% | **25%** | C9-65 |
| Uppmøting til nevndarfundir | % | 100% | **100%** | Sjálvboðin upplýsing |
| Annar tjóðskapur enn føroyskur hjá nevnd | % | 25% | **25%** | Sjálvboðin upplýsing |



# BURÐARDYGG MENNING KREVUR MIÐVÍSA LEIÐSLU

**J&K Petersen leggur dent á strategiska leiðslu, tí miðvísur leiðsluháttur er ein týðandi partur av arbeiðinum at skapa langtíðarvirðir á burðardyggum grundarlagi**

J&K Petersen metir strategiska leiðslu vera ein týðandi part av arbeiðinum at skapa burðardygg langtíðarvirðir. Í samsvari við VSME-leistin leggja vit dent á fakliga grundaðar og greiðar avgerðir, ábyrgdarfulla leiðslu umframt greitt ábyrgdarbýti í allari fyritøkuni.

J&K Petersen hevur eina virkna nevnd, sum hevur havt ein týðandi leiklut í at umskipa fyritøkuna seinnu árini. Nevndin er ein tættur strategiskur samstarvspartur hjá dagligu leiðsluni, og hon hevur stuðlað fyritøkuni í einum tíðarskeiði við stórum broytingum. Samstundis hevur nevndin tryggjað eftirlit við fíggjarligum úrslitum, váðastýring og langtíðarætlanum.

Vit eru fegin um at hava eina fjølbroytta nevnd, har bæði kynini eru umboðað, og har nevndarlimir við ymiskum fakligum førleikum bæði úr Føroyum og Danmark eru valdir. Royndirnar hjá nevndini fevna um løgfrøðiligan og fíggjarligan serkunnleika umframt vinnuliga vitan úr byggivinnuni. Harumframt eru eigarar og ein fyrrverandi stjóri eisini umboðað í nevndini. Henda samanseting hevur við sær, at fyritøkan verður væl stýrd í samsvari við góðan leiðslusið, og tað styrkir góðskuna í okkara avgerðum.

Vit viðurkenna, at okkara ábyrgd fevnir um meira enn sjálva fyritøkuna. Tað er ein natúrligur partur av okkara virksemi at vísa samfelagssinni við ymiskum stuðli. Vit royna at geva eitt jaligt íkast gjøgnum fíggjarligan stuðul og samstarv við áhugafeløg – vit royna sum heild at hava ein ábyrgdarfullan vinnuligan atburð.

Vit hava sum nevnt eina fráboðanarskipan, har starvsfólk kunnu lata inn klagur og uppskot um batar. Endamálið við skipanini er, at starvsfólk á ein tryggan og skipaðan hátt skulu kunna boða frá hendingum og gera viðmerkingar til mál, sum hava týdning fyri teirra dagliga arbeiði. Henda skipan stuðlar undir opinleika, eyðmerkir váðar tíðliga, eins og skipanin er ein partur av grundarlagnum undir støðugari menning. Fráboðanarskipanin varð nærri lýst í grein á síðu 46.

Vit viðurkenna at enda týdningin av fjølbroytni í leiðsluni – serliga í einari vinnu, ið vanliga hevur verið mansrikin. Vit stuðla kvinnuligari leiðslu og jøvnum møguleikum fyri bæði kyn á øllum stigum í fyritøkuni, og soleiðis staðfesta vit, at ymisk sjónarhorn ikki bara styrkja, men eisini tryggja góða leiðslu.

Á næstu síðunum ber til at lesa meira um, hvussu vit arbeiða við hesum málum.



# KVINNULIGIR LEIÐARAR Í EINARI MANNFÓLKAVERÐ

**Kvinnur hava í nógv ár sitið í ovastu leiðsluni í J&K Petersen, sum virkar í byggi- og verklagsvinnuni, har menn annars sita í flestu størvum. Tvær kvinnur siga her frá sínum upplivingum í leiðandi størvum í hesi mansriknu vinnu**

**Tað er ein týðandi partur av samleikanum hjá J&K Petersen, at fyritøkan hevði kvinnuligan stjóra longu í 1991, og at ein kvinna kom aftur í ovastu leiðsluna eftir umskipanina í 2022. J&K Petersen hevur – í einari annars mansriknari vinnu – í fleiri áratíggju verið slóðbrótandi innan fjølbroytni, javnstøðu og fevnandi leiðslu. Tað eru øki, sum í dag eru týðandi partur av nútímans ESG-arbeiði. Hoyr nærri frá teimum báðum, Ragnhild Arnóru Petersen, nevnd Guggan, og Annu Kalsø, hvussu tær hava upplivað sína starvsleið, og hvørji ráð tær hava til aðrar kvinnur, sum eru ella ynskja at gerast leiðarar.**

Í 1991 gjørdist Ragnhild Arnóra Petersen, millum manna betur kend sum „Guggan", stjóri í J&K Petersen. Guggan stjórnaði fyritøkuni í 20 ár – í bæði ringum og góðum tíðum.

Í 2021, 10 ár eftir at Guggan var farin frá sum stjóri, varð Anna Kalsø sett í starv sum menningarleiðari, og stutt eftir hetta varð hon eisini sett sum varastjóri.

Guggan hevur framvegis sæti í nevndini í J&K Petersen, og tí samstarva tær báðar um strategisku menningina av fyritøkuni.

Okkara samskipari í burðardygd, Súsanna Vang Toftegaard, setti seg niður til eitt prát við Gugguna og Annu fyri at hoyra nærri, hvussu tær uppliva mansriknu byggi- og verklagsvinnuna, hvussu tað er at vera kvinna í ovastu leiðsluni, og hvørjum arbeiðsavrikum tær báðar eru serliga ernar av.

***Guggan, hvussu vart tú móttikin, tá tú longu í 1991 gjørdist stjóri?***
*– Eg varð væl móttikin. Eg hevði starvast í felagnum leingi – í bókhaldinum – og starvsfólkini kendu meg væl. Eg var heldur ongantíð bangin fyri at taka eitt tak og hjálpa til, har tað var neyðugt, og tí var sambandið við starvsfólkini altíð gott.*

***Var tað sama galdandi úti í samfelagnum? Varð tað væl móttikið, at ein kvinna gjørdist stjóri í einari byggifyritøku?***
*– Ja, eg kann ikki minnast nakað annað, enn at móttøkan var jalig.*

***Hvørjum arbeiðsavriki ert tú mest errin av?***
*– Eitt sindur trupul spurningur til eina so langa starvsleið, men eg vil siga, at eg eri errin av, at eg ongar stórar ósemjur hevði, meðan eg var stjóri. Eg royndi altíð at loysa møguligar ósemjur í „upptaktini".*

***Anna Kalsø er tó skjót at leggja uppí:***
*– Eg haldi, at tú eigur at vera errin av at hava leitt fyritøkuna gjøgnum eina tí ringastu búskaparkreppuna í Føroyum. Tú hevur tryggjað eitt arbeiðspláss, sum yvirlivdi kreppuna, og sum hevði stóra framgongd tey eftirfylgjandi árini.*

***Guggan svarar:***

*– Ja, eg haldi faktiskt, at eg havi fortrongt, hvussu hørð tann tíðin var. Vit kláraðu okkum gjøgnum kreppuárini í 90'unum, men tað var ringt at gleðast um, tí nógv onnur noyddust at snara lykilin um og steðga virkseminum – og nógv fluttu eisini av landinum. So samstundis, sum tað var gleðiligt, at vit kláraðu okkum gjøgnum truplu tíðina, var tað sera tungt og syrgiligt at síggja, hvussu onnur stríðdust. So tað var ikki nøkur gleðistíð.*

***Tá Anna verður spurd um móttøku og arbeiðsavrik, svarar hon soleiðis:***

*– Eg haldi, at eg havi verið væl móttikin, og eg føli ongantíð, at tað hevur verið ein veikleiki – hvørki fyri meg ella J&K Petersen – at eg eri kvinna. Tvørturímóti. Tað hevur verið ein styrki upp á allar mátar. Vit eru og hugsa øðrvísi enn menn, og eg haldi, at tað hevur eitt stórt virði, at bæði kynini eru umboðað á leiðslustigi.*

*– Í mun til arbeiðsavrik er løgið nokk nakað av tí sama galdandi fyri meg sum fyri Ragnhild. Eg eri errin av, at vit hava vent gongdini, og at vit hava leitt felagið á rætta kós, hóast eg erligt má siga, at tað sá rættiliga svart út á heysti 2022, tá nýggja leiðslan varð sett.*

***Guggan skoytir uppí:***

*– Ja, eg havi mangan hugsað, um tit fóru at orka og tíma tað. Tí uppgávan, sum lá fyri framman, var bæði tung og stór.*

*– Har kann eg siga sum tú, svarar Anna – tað hevur ikki altíð verið stuttligt at leiða felagið á rætta kós. Vit hava minkað starvsfólkahópin við 25 prosentum, og tað er nakað, sum situr eftir kensluliga – at skula hava endað so nógvar starvssetanir fyri at tryggja framtíðina hjá fyritøkuni.*

J&K PETERSEN



Tær báðar kvinnurnar hugleiða eina løtu um, hvussu tær hava verið ígjøgnum hvør sína krepputíð hjá J&K Petersen. Hóast hvørki tíðirnar ella umstøðurnar hava verið eins, so hava tær í nógvum førum hugsað nøkulunda eins um støðurnar, sum tóku seg upp.

Guggan heldur fram at hugsa um starvsfólk, trupulleikar og uppsagnir – so nevnir hon, at fyrr hava tey í J&K Petersen upplivað, at fleiri starvsfólk høvdu rúsevnistrupulleikar. Tað komst av, at nógvir av teimum, sum komu í starv, áður høvdu siglt úti, og at tað ikki var óvanligt, at monnum dámdu væl at fáa sær eina kenning, tá teir vóru á landi.

*– Tað gongur bara ikki í einari byggifyritøku, sigur Guggan. – Har havi eg altíð valt at tosa við fólkini og roynt at hjálpa ella at finna eina loysn, heldur enn at enda starvssetanina.*

*– Tað er faktiskt áhugavert, at tú nevnir júst hetta, svarar Anna. – Tann politikkurin livir eftir í felagnum enn í dag – og stendur enntá svart upp á hvítt í okkara starvsfólkahandbók. Starvsfólk, sum dragast við rúsevnistrupulleikar, fáa bjóðað hjálp, og at koma til slíka samrøðu við leiðsluna hevur ongar starvsrættarligar fylgjur.*

*– Tað er gott, svarar Guggan, tí tað er soleiðis, vit eru.*

Allar tríggjar kvinnurnar eru samdar um, at tað er áhugavert, hvussu ein sterk mentan ella sterkt virði kann liva víðari í einari fyritøku gjøgnum aldarskifti, stjóraskifti og krepputíðir.

***Súsanna spyr Gugguna, hvat hon ynskir, at eftirtíðin skal minnast hana fyri.***
*– At eg altíð eri farin væl við fólki, svarar hon stutt og greitt.*

***Anna svarar sama spurningi:***
*– Eg má siga, at hjá mær snýr tað seg meira um avrikið seinastu árini – at hava verið við til at tryggja, at felagið enn er til. Tí vit eru eitt lutfalsliga stórt føroyskt arbeiðspláss, og vit hava týdning fyri samfelagið, sigur Anna.*

Her sita tvær kvinnur, sum hava sterkar meiningar, sterkar persónmenskur og stóra virðing fyri hvørji aðrari – bæði sum menniskju og leiðarar.

Tá tær verða spurdar, um tær hava nøkur góð ráð til kvinnur, sum ynskja at gerast leiðarar í einari mansriknari vinnu, eru tær nokk so samdar.

*– Ver kvinna, ver tú sjálv. Vit skulu ikki royna at verða menn, bara tí vit starvast næstan burturav saman við monnum, sigur Anna. – Vit eru góðar til at síggja heildarmyndina, at taka hond um persónligar trupulleikar – at vísa umsorgan, um støðan krevur tað, sigur Anna.*

*– Ja, bæði menn og kvinnur hava dygdir, sigur Guggan. Men júst tá tað kemur til tað, sum Anna nevnir, hava vit kvinnur munin. Tað er ein styrki, ikki ein veikleiki.*

***Súsanna spyr at enda, hvussu byggivinnan kann gerast meira áhugaverd fyri kvinnur.***

***Anna svarar:***
*– Eg haldi ikki, at tað er eitt endamál í sjálvum sær, at vit skulu kroysta kvinnur í størv ella inn í vinnur, sum tær kanska ikki tíma. Men eg haldi, at tað er okkara samfelagsliga ábyrgd at skapa umstøður og karmar, har bæði kynini kunnu mennast og trívast. So kunnu tey, sum ynskja tað, koma til okkara.*

*– Ja, vit hava altíð tikið væl móti bæði kvinnum og monnum, leggur Guggan afturat.*

Og her endar samrøðan við Gugguna og Annu, sum eru ávikavist nevndarlimur og varastjóri í J&K Petersen. Tað er eyðsæð, at tað setir sín dám á hesa fyritøkuna, sum virkar í einum mansriknum geira, at kvinnur eru í ovastu leiðsluni. Tær vístu á, at bæði kynini hava dygdir, og at saman kunnu vit fáa nógv burtur úr styrkini hjá hvørjum øðrum – og tað kann bara gagna fyritøkuni.



*Onkuntíð er gott ikki at vita, hvat liggur fyri framman. Hevði eg vitað, hvat lá fyri framman, tá eg tók við avbjóðingini at gerast ein partur av ovastu leiðsluni í 2022, so ivist eg stórliga, um eg hevði sagt ja. Men samstundis dámar mær avbjóðingar og at royna okkurt nýtt. Tí segði eg ja eftir at hava hugsað meg um í eitt samdøgur. Maðurin eggjaði mær til at siga ja, tí fá fólk sleppa at royna at reisa eitt felag aftur. Eydnast tað, so er tað stórur lærdómur og heiður, sum ein ikki kann lesa seg til. Eydnast tað ikki, so hevur tú eisini lært, hvat tú ikki skalt gera.*

**Anna Kalsø**
Varastjóri, J&K Petersen

*Samanumtikið er tað eingin trupulleiki at vera kvinnuligur stjóri í einari mannfólkaverð – um teir eru 100 ella 200, so er tað framvegis eingin trupulleiki.*

**Ragnhild Arnóra Petersen „Guggan“**
Nevndarlimur, J&K Petersen

# STUÐUL TIL ÍTRÓTT, MENTAN, LIST OG VÆLGERANDI ENDAMÁL

## J&K Petersen stuðlar ítrótti, mentan, list og vælgerandi endamálum í økjum, har fyritøkan hevur sítt virksemi

Vit hava eina sterka sannføring um, at felagsskapur og trivnaður í nærumhvørvinum hava stóran týdning bæði fyri okkara starvsfólk og fyri samfelagið sum heild. Tí lata vit fíggjarligan stuðul til ítrótt, mentan, list og vælgerandi endamál í teimum økjum, har vit hava okkara virksemi.

Ítrótturin hevur serligt pláss í okkara hjørtum. Hann skapar rørslu, samanhald og gleði, og vit síggja ítróttin sum ein týdningarmiklan máta at styrkja bæði likamligu og sálarligu heilsuna hjá fólki. Eins og vit leggja dent á, at okkara starvsfólk hava góðar møguleikar at røra seg og at røkja sína heilsu, so meta vit eisini, at tað hevur stórt virði, at fólk í nærumhvørvinum eru virkin og hava møguleika at luttaka í ítrótti.

Í 2024 og 2025 vóru 77% av allari stuðulsupphæddini latin ítróttarfeløgum, og tað er eitt greitt tekin um, hvussu nógv J&K Petersen virðismetir ítróttin.

**BÝTI AV STUÐLI 2024-2025**




J&K PETERSEN




TÓRSVØLLUR

# J&K PETERSEN LEGGUR DENT Á VARANDI VINNU

## Tá netverkið Varandi Vinna varð stovnað í 2024, var eyðsæð, at J&K Petersen skuldi gerast partur av hesum felagsskapi

J&K Petersen er ein av størstu byggi- og verklagsfyritøkunum í Føroyum, og tí var tað sjálvsagt, at vit skuldu hava limaskap í týðandi felagsskapinum, Varandi Vinna.

Vit hava bæði áhugan og viljan at taka við ábyrgdini at menna føroyska vinnulívið á ein burðardyggan og haldføran hátt. Sostatt er hetta ikki bert ein spurningur um at fylgja rákinum, men heldur ein spurningur um, hvørt vit í roynd og veru vilja, at føroyska samfelagið og vinnan verða før fyri at taka ímóti framtíðar avbjóðingum og gagnnýta framtíðar møguleikar.

Í netverkinum arbeiða vit saman við øðrum fyritøkum fyri at seta felags mál og finna loysnir, ið gagna bæði vinnuni, fólkunum í virðisketuni og umhvørvinum. Varandi Vinna er ein samstarvspallur, har fyritøkur í øllum støddum kunnu gerast limir og binda seg til hugsjónina um burðardygga vinnu. Endamálið er at fáa føroyskt vinnulív at raðfesta burðardygd og arbeiða á ábyrgdarfullan hátt, har bæði umhvørvisligt og sosialt tilfeingi verður gagnnýtt við skynsemi.

Netverkið leggur eisini dent á at gera tað lættari hjá smærri og miðalstórum fyritøkum sjálvbodnar at greiða frá virkseminum, og tí er ein felagsleistur fyri ESG-frágreiðing mentur. Hesin leistur tryggjar gjøgnumskygni og gevur eitt javnt grundarlag at gera samanberingar. Hetta er ein stórur fyrimunur, tí ESG-arbeiðið verður meira skipað og lætt at taka við í dagliga raksturin.

J&K Petersen merkir økt krøv uttanífrá um, at vit eiga at leggja dent á burðardygd. Í hesum sambandi gevur Varandi Vinna okkum bæði íblástur og amboð til at handfara hesi krøv á ein skipaðan hátt og á felags grundarlagi. Hetta styrkir okkara førleikar og tryggjar, at vit eru væl fyri at uppfylla tað, sum okkara áhugapartar vænta av okkum.

Vit hava verið virkin í netverkinum, Varandi Vinna, frá byrjan. Í 2024 høvdu vit ein stýrislim, og í 2025 átóku vit okkum forfólkasessin. J&K Petersen vil ganga á odda og vera ein virkin partur, tá talan er um at menna burðardygga vinnu í Føroyum.






***J&K Petersen merkir økt krøv uttanífrá um, at vit eiga at leggja dent á burðardygd. Í hesum sambandi gevur Varandi Vinna okkum bæði íblástur og amboð til at handfara hesi krøv á ein skipaðan hátt og á felags grundarlagi***

# VÁTTAN FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA

***Til áhugabólkarnar hjá P/F J&K Petersen***

**NIÐURSTØÐA VIÐ AVMARKAÐARI VISSU UM BURÐARDYGDARFRÁGREIÐING**
Vit hava gjørt eina váttanaruppgávu við avmarkaðari vissu til frágreiðingina um burðardygd hjá P/F J&K Petersen samtakinum eins og lýst í burðardygdarfrágreiðingini síðu 10–14, 32–37, 48, fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2025.

Grundað á okkara arbeiði og skjalprógv, ið vit hava fingið, eru vit ikki komin fram á viðurskifti ið geva okkum orsøk at halda, at frágreiðingin um burðardygd ikki í øllum týðandi lutum er gjørd í samsvari við §99a í ársroknskaparlógini, umframt at hon:

- Lýkur krøvini í EFRAG Voluntary Sustainability Reporting Standard for non-listed SMEs (VSME) basic module, íroknað tað av leiðsluni gjørda arbeiði fyri at eyðmerkja tær upplýsingar, sum frágreiðingin snýr seg um.

**GRUNDARLAG FYRI NIÐURSTØÐUNI**
Vit hava gjørt okkara váttan við avmarkaðari vissu samsvarandi ásetingunum í ISAE 3000 (dagført) Aðrar váttanir við vissu enn grannskoðan og gjøgnumgongd av søguligum fíggjarligum upplýsingum („ISAE 3000 (dagførd)") og øðrum krøvum galdandi í Føroyum.

Arbeiðið í sambandi við at gera eina váttan við avmarkaðari vissu er minni í vavi enn arbeiði í sambandi við grundaða vissu, bæði viðvíkjandi arbeiði í sambandi við meting av váðum, íroknað fatan av innanhýsis eftirlitinum og tað, sum er gjørt grundað á metta váðan. Sostatt er stigið fyri vissu, sum verður fingið í sambandi við eina uppgávu við avmarkaðari vissu, væl lægri enn vissan, sum hevði verið fingin, um talan var um eina uppgávu við grundaðari vissu.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi prógv, ið kunnu verða grundarlag undir okkara niðurstøðu. Okkara ábyrgd sambært hesum er nærri lýst í pettinum „Ábyrgd grannskoðarans".

**ÓHEFTNI OG GÓÐSKUSTÝRING**
Vit eru óheft av J&K Petersen samtakinum samsvarandi reglunum hjá International Ethics Standards Board for Accountants (IESBA Code) um etiskan atburð hjá grannskoðarum og øðrum ásetingum, ið eru galdandi í Føroyum, eins og vit hava hildið etisku skyldurnar sambært hesum krøvum, og IESBA Code.

P/F Januar, løggilt grannskoðaravirkið er fevnt av altjóða standardum um góðskustýring, ISQM 1, sum krevur, at vit seta í verk og nýta eina góðskustýringskipan, sum millum annað umfatar skjalprógvaðar leiðreglur og virkisgongdir um at halda tey etisku krøvini, yrkisligar standardir og galdandi krøv sambært lóg og øðrum ásetingum.

**ÁHERÐSLA AV VIÐURSKIFTUM VIÐVÍKJANDI VÁTTANARUPPGÁVUNI**
Samanberingartølini í burðardygdarfrágreiðingini fyri J&K Petersen samtakinum fyri roknskaparárið 1. Januar – 31. Desember 2024 og eldri eru ikki umfatað av váttanaruppgávuni. Okkara niðurstøða er ikki broytt í hesum sambandi.

**AVMARKINGAR Í SAMBANDI VIÐ ARBEIÐIÐ AV BURÐARDYGDARFRÁGREIÐINGINI**
Við fráboðan av framtíðar upplýsingum í samsvari við ESRS er leiðslan skyldug at gera tær framskygdu upplýsingarnar út frá kunngjørdum fortreytum um hendingar, sum kunnu henda í framtíðini, og møguligum framtíðarátøkum hjá samtakinum. Tað faktiska úrslitið verður helst øðrvísi, tí væntaðar framtíðar hendingar hava helst ikki tað úrslitið sum verður væntað í dag.

**ÁBYRGD LEIÐSLUNNAR**

Leiðslan hevur ábyrgd av at leggja til rættis og seta í verk eina mannagongd við tí endamáli at eyðmerkja tær upplýsingar, ið eru givnar í frágreiðingini um burðardygd, og at upplýsa um hesa mannagongd í burðardygdar frágreiðingini 2025. Hendan ábyrgd fevnir um:

- eina fatan av, hvussu virksemi og vinnulig sambond hjá J&K Petersen samtakinum virka og fáa eina fatan av teimum áhugapørtum, ið ávirkast av hesum.
- at eyðmerkja veruliga og møguliga ávirkan (bæði negativa og positiva) í mun til burðardygdarviðurskifti umframt váðar og møguleikar, sum hava ávirkan á ella kunnu væntast at hava ávirkan á fíggjarstøðuna hjá J&K Petersen samtakinum, fíggjarligu støðuni, roknskaparliga úrslitið, peningastreymin, atgongd til fígging ella fíggjarkostnaðir í stutt, miðal og longri tíðarskeið.
- at meta um týdningin av eyðmerktu ávirkanunum, váðunum og møguleikunum í mun til burðardygdarviðurskifti við at velja og nýta hóskandi stig av týdningi.
- Virðisáseting og rapportering av upplýsingum í burðardygdarfrágreiðingini grundað á roknskaparháttin, og
- at áseta fortreytir, sum eru rímiligar í mun til umstøðunum.

*Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av at gera frágreiðingina um burðardygd samsvarandi §99a í ársroknskaparlógini íroknað:*

- fylgja ásetingum í ESRS,
- at leggja til rættis, implementera og upprætthalda tær innanhýsis mannagongdirnar, sum leiðslan metir verða neyðugar til at framleiða eina burðardygdarfrágreiðing uttan týðandi feilir, uttan mun til um hesir eru tilvitaðir, ella ótilvitaðir, og
- at velja og brúka hóskandi hættir til frágreiðingina um burðardygd og at áseta treytir og til at gera metingar, sum eru rímiligar eftir umstøðunum

**ÁBYRGD GRANNSKOÐARANS**

Okkara ábyrgd er at leggja til rættis og gera eina váttanaruppgávu við tí endamáli at fáa eina avmarkaða vissu fyri, at frágreiðingin um burðardygd er uttan týðandi feilir, uttan mun til um hesar eru tilvitaðar ella ótilvitaðar, og geva eina váttan við avmarkaðari vissu við okkara niðurstøðu.

Feilupplýsingar kunnu standast av sviki ella feilum og verða mettir týðandi, um tað er sannlíkt, at tær hvør í sínum lag, ella samlað, hava ávirkan á tær avgerðir, sum brúkararnir grunda sínar avgerðir á í frágreiðingini um burðardygd í síni heild.

Sum partur av arbeiðinum við at geva eina váttan við avmarkaðari vissu, ið verður gjørd samsvarandi ISAE 3000 (dagførd), gera vit fakligar metingar og hava eitt yrkisligt ivasemi meðan vit arbeiða.

*Okkara ábyrgd viðvíkjandi arbeiðinum umfatar:*

- at fáa eina fatan av innanhýsis eftirlitinum, tó ikki við tí endamáli at gera eina niðurstøðu um, hvussu virkið innanhýsis eftirlitið er, íroknað úrslitið av innanhýsis eftirlitinum,
- at meta um, hvørt tær upplýsingar, ið eru eyðmerktar, eru í samsvari við tann av „EFRAG Voluntary Sustainability Reporting Standard for non-listed SMEs“ (VSME) ásetta roknskaparhátti, og
- at leggja til rættis og meta um, hvørt innanhýsis mannagongdirnar eru samsvarandi lýsingini hjá felagnum.

*Okkara ábyrgd í sambandi við frágreiðingina um burðardygd fevnir eisini um:*

- at eyðmerkja upplýsingar, har sannlíkt er, at týðandi skeivleikar kunnu standast av sviki ella feilum, og
- sum miða móti upplýsingum í frágreiðingini, har tað er sannlíkt, at týðandi feilupplýsingar kunnu verða. Vandin fyri ikki at avdúka týðandi upplýsingar orsakað av sviki er størri, enn tá talan er um týðandi skeivar upplýsingar orsakað av feilum, av tí at svik kann fevna um samansvørjing, skjalafalsan, tilætlaða burturlegging, villeiðandi upplýsingar, ella at innanhýsis eftirlitið verður skúgvað til síðis.

**SAMANUMTØKA AV GJØRDA ARBEIÐINUM**

Arbeiðið í sambandi við eina váttan við avmarkaðari vissu fevnir um at fáa skjalprógv fyri frágreiðingini um burðardygd.

*Vavið, hvat slag av arbeiði og tíðarætlan fyri ætlaða arbeiðið er treytað av fakligari meting, íroknað eyðmerking av upplýsingum, har tað er sannlíkt, at týðandi feilir kunnu stinga seg upp í frágreiðingini um burðardygd, óansæð um hesir skyldast sviki ella feili. Í sambandi við okkara váttan við avmarkaðari vissu hava vit viðvíkjandi innanhýsis eftirlitinum:*

- fingið eina fatan av innanhýsis eftirlitinum við at seta spurningar fyri at skilja grundarlagið undir teimum upplýsingunum, sum leiðslan nýtir, og við at gjøgnumganga innanhýsis skjalprógv av teirra innanhýsis eftirliti; og

- gjørt eina meting av, hvørt tey grannskoðanarprógv, sum vit hava fingið í sambandi við arbeiðið av innanhýsis eftirlitinum, sum felagið hevur sett í verk, er í samsvari við ásetingarnar hjá „EFRAG Voluntary Sustainability Reporting Standard for non-listed SMEs (VSME)"

*Í sambandi við okkara arbeiði við váttanini við avmarkaðari vissu hava vit víðvíkjandi frágreiðingini um burðardygd:*

- fingið eina fatan av mannagongdum hjá J&K Petersen samtakinum, ið eru viðkomandi fyri at gera frágreiðing um burðardygd við at fáa eina fatan av innanhýsis umhvørvinum, mannagongdum og skipanum hjá samtakinum, ið eru viðkomandi fyri frágreiðingina, tó uttan at gera eina ítøkiliga meting, hvussu innanhýsis mannagongdirnar virka, fáa skjalprógv fyri at hesar eru sett í verk ella royna, hvussu tær virka.

- mett um týðandi upplýsingar, ið eru eyðmerktar í innanhýsis eftirlitinum, eru við í frágreiðingini um burðardygd og í samsvari við ESRS

- sett viðkomandi starvsfólkum fyrispurningar og gjørt greinandi arbeiði viðvíkjandi útvaldum upplýsingum í frágreiðingini um burðardygd

- gjørt ítøkiligt arbeiði í mun til útvaldar upplýsingar í frágreiðingini um burðardygd

- mett um hættir, treytir og upplýsingar til at gera týðandi metingar og framtíðar upplýsingar og, hvussu hesir hættir eru nýttir.

- har tað hevur verið viðkomandi, hava vit samanhildið útvaldar upplýsingar í burðardygdar frágreiðingini við upplýsingar í ársroknskapinum og leiðslufrágreiðingini.

Tórshavn, hin 26. februar 2026

**P/F Januar**
løggilt grannskoðaravirki

Óli Joensen
statsautoriseret revisor



J&K PETERSEN